# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Varðin Pelagic** | |
| Bústaður hjá virki: Havnarlagið 11, 800 Tvøroyri | |
| Galdandi fyri virksemi: Uppisjóvarvirki – flakskering og innfrysting. Súrløgu-, fiskaprotein- og lýsiframleiðsla. | |
| Matr. nr.: Matr. 493b, 493a, 887a og á nýggju útfyllingini | V-tal: 596191 |
| Mál nr.: Málnr. 17/00480 og 24/06429 | Galdandi frá: 25-11-2024 |

Argir, hin 25. november 2024

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri

1. GÓÐKENNING OG HEIMILDIR .... 3
2. UMSÓKNIN .... 4
2.1. MÁLSVIÐGERÐ .... 4
2.2. HOYRING .... 5
3. VIRKSEMI OG UMHVØRVISVIÐURSKIFTI .... 12
4. GÓÐKENNINGARTREYTIR .... 13
4.1. ALMENNAR TREYTIR .... 13
4.2. INNRÆTTING OG RAKSTUR .... 14
4.3. GOYMSLUR .... 14
4.4. SPILLLUFT .... 16
4.5. SPILLVATN .... 17
4.6. ÓLJÓÐ, RISTINGAR OG LJÓS .... 18
4.7. BURTURKAST .... 19
4.8. ÁFYLLING AV OLJUTANGUM .... 20
4.9. GRÓTFYLLA ÚT Á SJÓGV .... 20
4.10. TILBÚGVING MÓTI DÁLKING VEGNA ÓHAPP .... 21
4.11. INNANEFTIRLIT OG KANNINGAR .... 21
4.12. RAKSTRARSKRÁSETING OG UMHVØRVISFRÁGREIÐING .... 25
5. KÆRUVEGLEIÐING .... 25
6. FYLGISKJAL 1. LÝSING AV VIRKSEMINUM .... 26
6.1. STAÐSETING .... 26
6.2. FRAMLEIÐSLA .... 27
7. FYLGISKJAL 2. LÝSING AV UMHVØRVISVIÐURSKIFTUM .... 30
7.1. ORKUSKIPAN .... 30
7.2. GOYMSLUR .... 30
7.3. ÚTLÁT TIL LUFT .... 31
7.4. ÚTLÁT Á SJÓGV .... 32
7.5. ÓLJÓÐ .... 33
7.6. BURTURKAST .... 34
7.7. TILBÚGVING MÓTI BRÁDLIGA ØKTARI DÁLKING .... 35

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av uppisjóvarvirki hjá P/F Varðin Pelagic, sum tekur ímóti uppisjóvarfiski, sker flak, frystir og framleiðir súrløgu, fiskaprotein og lýsi á matr. nr. 493a, 493b, 887a og á nýggju útfyllingini á Havnarlagnum 11 á Tvøroyri, er givin við heimild í §§ 26, 29 og 36, 3. stk. í umhvørvisverndarlógini[1] og § 1, nr. 4 í kunngerð[2] um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

Eftirlitið við virkseminum verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Sambært § 26 í umhvørvisverndarlógini mugu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir nevnd í fylgiskjalinum til lógina ikki verða gjørd ella farin undir, fyrr enn góðkenning er givin til slíkt. Hesi kunnu ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend av Umhvørvisstovuni.

Hóast fyritøkur, virkir ella útbúnaðir ikki verða broytt sambært § 26, kann Umhvørvisstovan sambært § 34, stk. 4 í 5 ár eftir, at góðkenningin er givin, sambært § 34, stk. 4 í lógini[1], broyta góðkenningartreytirnar, um so er at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin,
- dálkingin elvir umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin varð givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Umhvørvisstovan hevur brúkt norðurlendskar, í høvuðsheitum danskar vegleiðingar og góðkenningar sum grundarlag til at áseta treytir til spillvatn, spillluft, óljóð o.a.

Umhvørvisstovan metir at virksemið á virkinum hjá Varðanum Pelagic kemur undir punkt F. nr. 7 og 9, í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, hetta eru fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum og fóðurevnisverksmiðjur. Punkt F, nr. 7 er merkt við eini stjørnu. Tað merkir, at Umhvørvisstovan kann gera undantak frá kravinum um umhvørvisgóðkenning, um Umhvørvisstovan metir, at dálkingin frá virkinum er uttan týdning fyri umhvørvið. Hetta er ikki galdandi fyri punkt. F, nr. 9. Umhvørvisstovan metir, at útlátið frá virkinum kann hava týdning fyri umhvørvið, og at krav tí  er um umhvørvisgóðkenning bæði sambært punkt F, nr. 7 og nr. 9.

---

[1] Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum,

[2] Kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka heilsuskaðar og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

Umhvørvisgóðkenningin er givin við teimum treytum, sum eru lýstar í kap. 4, Góðkenningar-treytir. Treytirnar eru settar við støði í umsóknini, tilfari, sum er lagt aftrat, og teimum upplýsingum, sum eru komnar fram undir málsviðgerðini.

# 2. Umsóknin

Verandi virksemi hjá Varðanum Pelagic hevur umhvørvisgóðkenning frá 2012 Henda góðkenning er til uppisjóvarvirkið á havnarlagnum á Tvøroyri, US mál nr 17/00480. Ætlanin er at víðka virksemið til eisini at framleiða fiskaprotein og lýsi burtur úr avskurði og fráskildum fiski frá verandi framleiðslu og í ávísum førum frá heilum ella pørtum av lastum, sum verða landaðar til virkið. Harumframt er ætlanin at framleiða súrløgu frá fiski og avskurði frá framleiðsluni. Av tí at hetta er ein heilt nýggj framleiðsla, metir Umhvørvisstovan, at tað er neyðugt at endurnýggja verandi umhvørvisgóðkenning og hevur tí, grundað á § 26 stk. 1 í lógini um umhvørvisvernd, tikið avgerð um, at virksemið skal hava nýggja umhvørvisgóðkenning.

Hin 20. januar 2023 fekk Umhvørvisstovan umsókn um nýggja umhvørvisgóðkenning frá P/F Varðin Pelagic. Umsóknin var tó ikki fullfíggjað, tí alt tilfarið var ikki klárt. 21. mars 2024 fekk Umhvørvisstovan umsókn um umhvørvisgóðkenning av ætlaðu súrløguframleiðsluni. 2. apríl 2024 fekk Umhvørvisstovan endaligu umsóknina um umhvørvisgóðkenning av fiskaprotein- og lýsivirkinum. Við umsóknunum var lýsing av virkseminum, tekningar og aðrar viðkomandi upplýsingar.

Hetta er í samsvari við § 30 í umhvørvisverndarlógini um, at saman við umsókn um góðkenning sambært §§ 26-28 skulu verða hjálagdar neyðugar ætlanir, tekningar og frágreiðingar, ið gera ætlanina skilliga, umframt ein tilskilan av slagnum og nøgdini av ætlaðu ella verandi dálkingini. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar fyri at minka um hesa dálking.

## 2.1. Málsviðgerð

Vísandi til § 1, 1. stk. í umhvørvisverndarlógini er dentur lagdur á at fyribyrgja og minka um dálking av luft, vatni og jørð, at fyribyrgja og minka um ampar av larmi, at fyribyrgja dálking við burturkasti og at fremja endurnýtslu.

Harafturat er dentur lagdur á at tryggja teir eginleikar í ytra umhvørvinum, ið hava týdning fyri heilsufrøðilig og rekreativ kor hjá menniskjum og fyri at varðveita fjøltáttað plantu- og djóralív sambært 2. stk. í somu grein.

Í viðgerðini av umsóknini og í sambandi við at áseta treytir, er m.a. hetta tilfar nýtt:

- Umsóknir um umhvørvisgóðkenning dagfestar 21.03.2024 og 02.04.2024 við tilhoyrandi fylgiskjølum.

- Umhvørvisfrágreiðing 2023.
- Umhvørvisárinsmeting fyri protein- og lýsivirki hjá Varðanum Pelagic frá 22.02.2024
- Umhvørvisgóðkenning hjá P/F Varðin Pelagic frá 27.08.2012 og tilfar sum varð sent Umhvørvisstovuni í sambandi við, at virkið bleiv bygt uppaftur í 2017/2018.
- Vegleiðing frá Miljøstyrelsen: Ekstern støj fra virksomheder, vejledning nr.5, 1984
- Luftvejledningen, Vejledning fra Miljøstyrelsen nr. 2, 2001
- Luktvejledningen, Vejledning fra miljøstyrelsen 1985 og udkast til ny lugtvejledning fra 2017.
- Standardardar og markvirðir fyri spillvatn.

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at dálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt
- at virkið hevur mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum
- at útgerð til at basa dálking frá óhappum skal vera tøk
- at virkið støðugt minkar um ampar frá dusti og lukti
- at virkið avmarkar óljóð mest møguligt
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum
- at besta tøka tøknin, sambært BAT[3]-hugtakinum, verður nýtt í mest møguligan mun.

Hin 2. august 2024 sendi Umhvørvisstovan uppskot til umhvørvisgóðkenning til viðmerkingar hjá P/F Varðin Pelagic. P/F Varðin Pelagic hevði nakrar viðmerkingar og rættingar, serliga til lýsingina av virkseminum, umframt nakrar viðmerkingar og nágreiningar til ymisk viðurskifti í sambandi við ásettar treytir. Umhvørvisstovan hevur gjørt rættingar í tekstinum og í nøkrum av treytunum.

## 2.2. Hoyring

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð hin 6. september 2024 sent P/F Varðan Pelagic, Tvøroyrar kommunu og Heilsufrøðiligu Starvsstovi til hoyringar. Harumframt var uppskotið til umhvørvisgóðkenning lagt út á heimasíðuna hjá Umhvørvisstovuni, so at grannar hjá virkinum kundu koma við viðmerkingum.

---

[3] **Best Available Techniques (BAT)**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

Tvøroyrar kommuna hevði ongar viðmerkingar til uppskotið til umhvørvisgóðkenning.

Varðin Pelagic hevði spurningar um hvussu ávísar treytir um spillvatn og goymslu skuldu skiljast. Umhvørvisstovan broytti onkra orðing, so at treytin gjørdist greiðari, og hevur samskift við Varðan Pelagic um hetta.

Heilsufrøðiliga Starvstovan (HFS) vísti til viðmerkingar, sum vórðu sendar inn í sambandi við hoyringina av uppskoti til góðkenning av virkseminum hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri sambært § 21 í havumhvørvislógini og tilhoyrandi árinsmeting, og spyr HFS um niðurstøðuna hesum viðvíkjandi. Viðmerkingarnar frá HFS snúðu seg serliga um staðseting av munnanum á spillvatnsleiðingini frá framleiðsluni og frástøðu til aliøki A-15. Umhvørvisstovan hevur viðgjørt hesar viðmerkingar í góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini og eru treytir settar til frástøðu og rák frá frá munnanum á spillvatnsleiðingini í mun til aliøki A-15. Treytir verða eisini settar til hetta í umhvørvisgóðkenningini.

P/F Bakkafrost sendi eisini inn viðmerkingar, sum snúðu seg um staðsetingina av spillvatnsleiðingini frá virkinum. Bakkafrost vísir á, at tá spillvatn verður leitt á sjógv, er vandi fyri, at smittuevni kunnu vera í vatninum, og um illa vil til, kann eitt møguligt smittuevni elva til smittandi sjúku hjá laksi. Bakkafrost hevur í dag alivirksemi á A-15, sum er sunnan fyri Froðbiar bygd. Havandi í huga smittuvandan, sigur Bakkafrost, at tað sostatt er ynskiligt, at spillvatnsleiðingin verður løgd út um aliøkið og út á streymasjógv, har streymur ikki førir spillvatnið innaftur á fjørðin. Sambært § 9, stk 1. 1) í kunngerð nr. 80 frá 14. juni 2019 um stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, skal frástøðan frá har frárensluvatn verður latið út frá alistøð ella virki á landi til alistøð á sjónum til fisk, vera í minsta lagi 1 km. Henda frástøða er sett orsakað av vandanum fyri, at smittandi sjúka verður spjadd millum alistøðir. Umhvørvisstovan hevur í umhvørvisgóðkenningini sett treyt um, at frástøðan frá munnanum á spillvatnsleiðingini frá virkinum hjá varðanum Pelagic til aliøki A-15 verða í minsta lagi 1 km. Harumframt er treyt um, at rákið frá útlátinum ikki rekur beint móti aliøki A-15. Av tí at hetta eru strangari treytir enn settar eru í kunngerð um stovnan og sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum fyri at tryggja at sjúka ikki verður spjadd, metir Umhvørvisstovan treytirnar verða nøktandi.

Áhugafelagið Livilig kor sendi inn skriv við viðmerkingum til uppskotið til umhvørvis-góðkenning, heruppií viðmerkingar til uppsetan av súrløgutangum. Harumframt sendi Livilig kor fleiri ljóðbrot frá virksemi á virkinum og myndir av uppseting av súrløgutangum. Niðanfyri hevur Umhvørvisstovan tikið samanum og viðgjørt viðmerkingarnar frá áhugafelagnum.

**Viðvíkjandi uppsetan av súrløgutangum.**

Í juni 2024 kunnaði Varðin Pelagic Umhvørvisstovuna um, at tangar til súrløgu vóru komnir til Tvøroyrar, og at Varðin Pelagic ynskti at byrja at seta tangarnar upp, so at teir kundu vera klárir at taka ímóti avskurði, tá ið framleiðslan byrjaði aftur, helst aftan á Ólavsøku.

Sambært umhvørvisverndarlógini mugu fyritøkur, virkir ella útbúnaðir (sum sambært fylgiskjalinum til lógina skulu hava umhvørvisgóðkenning) ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend. Um Varðin Pelagic einans skuldi víðka virksemið við eini súrløguframleiðslu, hevði Umhvørvisstovan gjørt eina meting av um tað var neyðugt við nýggjari umhvørvisgóðkenning. Tað, at virkið skuldi víðkast við protein og lýsiframleiðslu

gjørdi, at Umhvørvisstovan tók avgerð um, at virkið skuldi hava nýggja umhvørvisgóðkenning, tí mett var at hetta fór at ávirka útlátið frá virkinum. Varðin Pelagic boðaði Umhvørvisstovuni frá ætlanini um súrløguframleiðslu aftan á, at avgerðin um nýggja umhvørvisgóðkenning var tikin. Umhvørvisstovan metti ikki, at uppseting av súrløgutangum og framleiðsla av súrløgu fór at økja um dálkingina frá virkinum, um treytirnar í verandi umhvørvisgóðkenning verða hildnar. Tí góðtók Umhvørvisstovan, at Varðin Pelagic setti upp súrløguframleiðsluna, hóast nýggja umhvørvisgóðkenningin ikki var liðug. Tó kunnaði Umhvørvisstovan Varðan Pelagic um, at nýggja góðkenningin eisini skuldu umfata súrløguframleiðsluna og at fleiri treytir helst fóru at verða settar til alla framleiðsluna í nýggju góðkenningini, harundir eisini súrløguframleiðslu.

Livilig kor hevði viðmerkingar um, hvønn part av fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina súrløguframleiðsla kom undir og metti tað verða bólk G nr.1 meðan Umhvørvisstovan metir, at tað er bólkur F. Livilig kor sigur, at súrløguframleiðslan tí skal hava umhvørvisgóðkenning og vísir eisini á, at hetta er krav sambært kunngerðum í Danmark.

Umhvørvisstovan er samd um, at súrløguframleiðsla kemur undir virksemi, sum skal hava umhvørvisgóðkenning sambært § 26 í lógini, hetta uttan mun til um súrløga kemur undir bólk G ella F í fylgiskjalinum. Bólkur G. er *"Goymsla, varðveitsla ella viðgerð av burturkasti annars."* Nr. 1 er *"Virkir til goymslu ella varðveitslu av burturkasti, her uppi í tyrvingarstøð, ruskdungar og serligar goymslur til evju ella ilsku, móttøkumiðstøð ella móttøkupláss til oljuburturkast ella evnafrøðiligt burturkast umframt ruskbrennistøðir."* Umhvørvisstovan metir ikki at súrløga er at meta sum burturkast, tí hon kann verða brúkt til fóðurframleiðslu. Tí metir Umhvørvisstovan at súrløga kemur undir bólk F. *"tilvirkan av rávørum úr djórum"* Nr. 7 og 9 *"fyritøkur til framleiðslu av fiskaúrdráttum og fóðurevnirverksmiðjur"*.

Í hesum føri er tó talan um at leggja súrløguframleiðslu aftrat einum virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning, har treytir eru settar til virksemið. Treytir verða settar fyri at minka um útlátið frá dálkandi virksemi. Treytirnar, sum eru settar til virkið hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri, eru í stóran mun líkar treytum, sum høvdu verið settar til eitt virkið til súrløgu t.d. treytir um goymslur, spillvatn o.a. Treytirnar í verandi umhvørvisgóðkenning frá 2012 eru galdandi fyri alt virksemið á virkinum, og eru tí eisini galdandi fyri súrløguframleiðsluna, sum nú er sett upp. Tí metti Umhvørvisstovan ikki, at útlátið frá virkseminum fór at økjast um treytirnar í verandi góðkenning verða hildnar.

Í viðmerkingunum frá Livilig kor um súrløgutangar, verður eisini nevnt ymiskt um byggiloyvi frá Tvøroyrar kommunu í sambandi við uppseting av súrløgutangum, men hetta er ikki málsøki hjá Umhvørvisstovuni og verður tað ikki viðgjørt nærri.

### Viðvíkjandi trygd

Livilig kor hevur nakrar viðmerkingar viðvíkjandi trygd, serliga í sambandi ammoniakk, sum verður brúkt í sambandi við at frysta liðugvøru og frystigoymsluna. Livilig kor vísur til *"risikobekendtgørelsen"* úr Danmark, sum sigur, at ammoniakkgoymslur størri enn 5 tons skulu verða 200 metrar frá búseting. Risikobekendtgørelsen er ikki galdandi fyri Føroyar, men Umhvørvisstovan hevur biðið Varðan Pelagic greiða frá trygdarskipanum í sambandi við frystiútgerð við ammoniakk og eftirlitið við hesum. Varðin Pelagic sendi Umhvørvisstovuni frágreiðing um hesi viðurskifti umframt ymisk fylgiskjøl, sum lýsa hetta nærri. Varðin Pelagic greiðir frá, at goymslan av ammoniakki er 32 tons býtt í fýra tangar og at goymslan er bygd

undir sera tryggum kørmum. Veggir til allar síður eru úr armeraðum betongi, við sprinkling og neyðtøming út á sjógv. Um ein størri leki hendir, verður ein "shut down" skipan aktiverað, sum steingir høvuðsventilar, og øll ammoniakkskipanin lukkar niður. Sambært Varðanum Pelagic var avgerð tikin um at projektera køli og frystiskipanina eftir donskum reglum, tá ið virkið varð bygt uppaftur. Hetta so at skipanin fór at verða í tráð við komandi føroyskar reglur, eitt nú kunngerð um innrætting og nýtslu av trýstberandi útbúnaði, sum kom í gildi í Føroyum í august 2018. Køli og frystiskipanin hjá Varðanum Pelagic er góðkend av arbeiðs- og brunaeftirlitinum, tá ið endaliga uppsetingin var gjørd tann 16. oktober 2018. Varðin Pelagic hevur sent Umhvørvisstovuni avrit av góðkenningini, har tað stendur at skipanin er góðkend til vanligan rakstur. Harumframt stendur, at køliskipanin skal eftirkannast árliga av einari kølifyritøku, ið er løggild av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Varðin Pelagic upplýsir, at avtala um eftirlit og viðlíkahald er gjørd við Frost, sum hevur løggilding frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Í frágreiðingini staðfesti Varðin Pelagic eisini, at í sambandi við eldsbrunan í 2017 riggaðu allar trygdarskipanir við ammoniakkskipanini, sum tær skuldu, tí ammoniakkskipanin stóð heil aftaná eldsbrunan. Eftir at hava fingið frágreiðing frá Varðanum Pelagic metir Umhvørvisstovan ikki, at neyðugt er at seta fleiri treytir til trygd í sambandi við køli- og frystigoymsluna, tí skipanin er góðkend og undir eftirlitið av øðrum myndugleika.

**Viðvíkjandi ampum**

Livilig kor nevnir fleiri ferðir í viðmerkingunum, at í Danmark skal ein VVM (vurdering af virkning på Miljø) gerast fyri serliga dálkandi virkir. Hetta er ikki partur av føroysku umhvørvisverndarlógini, men ein árinsmeting gjørd fyri virksemi hjá Varðanum Pelagic sambært havumhvørvisverndarlógini, hon umfatar tó einans ávirkan á sjónum og fram við sjóvarmálanum.

Livilig kor vísir eisini til "håndbog om miljø og planlægning" og til "vejledning om miljøklasser". Sagt verður, at tað til eina umhvørvisgóðkenning ítøkiliga skal metast, um serliga dálkandi virksemi kann góðtakast, har ætlaða staðsetingin er fráboðað, og at umhvørvisgóðkenningin bert kann gevast, um staðsetingin er sambært galdandi býarskipan og byggisamtykt, har ætlaða økið er lagt út til serliga dálkandi virksemi. Í "Vejledning om miljøklasser", eru umhvørvisflokkar frá 1 til 7 eftir hvat slag av virksemi og dálking talan er um. Flokkingin er grundað á "Håndbog om Miljø og Planlægning". Flokkingarnar vísa á minstu frástøðu ið mett verður neyðug millum ávíst virksemi og búseting. Fiskaprotein og lýsivirki eru flokkað í bólki 6-7, har vegleiðandi frástøða til bústaðarøki er 300 og 500 m. Livilig kor sigur í viðmerkingunum, at Umhvørvisstovan ikki hevur tikið atlit til hesa vegleiðing, men fatanin hjá Umhvørvisstovuni er at "Vejledning om miljøklasser" er eitt planleggingaramboð hjá kommununum. Tað eru kommunurnar, sum gera byggisamtyktir, sum verða staðfestar av landstýrisfólkinum, og eru tað sostatt kommunurnar, sum kunnu brúka vegleiðingina í viðgerð at byggisamtyktum. Umhvørvisstovan fyriheldur seg til galdandi byggisamtykt, tá ið mál um umhvørvisgóðkenning verða viðgjørd. Umhvørvisstovan ásetur vanliga ikki eina minstu frástøðu frá umhvørvisgóðkendum virkjum til nærmasta bústað. Í umhvørvisgóðkenningini setur Umhvørvisstovan treytir til útlát frá virkseminum t.d. til óljóð, lukt, spillvatn, goymslur o.a. Her kann vegleiðandi frástøða til bústaðir geva eina ábending um ampar kunnu væntast av virkseminum. Um virkið liggur tætt við bústaðir kann verða neyðugt við betri skjalprógvum fyri, at virkið kann halda markvirðini í umhvørvisgóðkenningini, og møguliga verða strangari treytir



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

settar til eftirlit við, at ampar ikki eru av virkseminum. Umhvørvisstovan hevur tí kravt simuleringar av óljóði og lukti, umframt at treytir eru settar um kanningar tá ið virksemið er farið í gongd, fyri at staðfesta um markvirðini verða hildin. Um eitt virki ikki heldur treytirnar í umhvørvisgóðkenningini, skal virkið gera neyðugar broytingar so treytirnar vera hildnar. Verður tað ikki gjørt, kann Umhvørvisstovan banna framhaldandi rakstri.

Livilig kor vísa á, at álvarsamastu umhvørvisárin frá súrløgu- protein- og lýsiframleiðslu standast av lukti. Umhvørvisstovan hevur sett treyt um, at Varðin Pelagic skal brúka best tøku tøkni (BAT) at reinsa ella viðgera luft frá framleiðsluni. Livilig kor siga, at BAT ikki verður brúkt, men at BAT er kolfiltur og evnafrøðilig filtur til royk og luktreinsing. Umhvørvisstovan hevur eftir at viðmerkingarnar komu inn biði Varðan Pelagic greiða nærri frá vali av reinsiskipan fyri lukt. Varðin Pelagic vísir til BAT tjecklista fyri "industrielle emmissioner for slagterier og virksomheder, der forarbejder animalske biprodukter og/eller spiselige sideprodukter. Í tjecklistanum eru fleiri hættir til at avmarka innihaldið av evnum, ið geva ringan lukt, eitt nú $H_2S$ og $NH_3$". Kolfiltur og evnafrøðilig filtur eru ikki nevnd sum BAT á tjecklistanum. Varðin Pelagic upplýsir, at tey hava ráðført seg við fleiri serfrøðingar um, hvør besta loysnin fyri at reinsa luftina er, so at ampar ikki verða av lukti frá virkseminum. Avgjørt varð at brúka eina skipan, har tann mest luktandi luftin frá framleiðsluni verður reinsað í einum forskrubbara. Síðani verður luftin reinsað enn einaferð í skrubbara og so leidd til brenning í dampketlilanleggi. Í svarinum um val av reinsiskipan til lukt, verður eisini greitt frá, at í sambandi við goymslur verður aktivt kol brúkt til luft reinsing á siloum, meðan rúmluft frá goymslubygningi verður sogin til sjógvskrubbarar til reinsing, hetta sambært BAT for emissioner fra oplag. Haraftrat verður ein umsitingarætlan fyri lukt gjørdur, sambært BAT for industrielle emissioner for Slagterier og virksomheder, der forarbjeder animalske biprodukter og/eller spiselige sideprodukter.

Umhvørvisstovan metir tí, at valda loysnin hjá Varðanum Pelagic lýkur treytirnar fyri BAT til luftreinsing, umframt at simuleringar hava víst, at við valdu reinsing og 60 metur høgum skorsteini, kann virkið halda markvirðini fyri lukt, sum Umhvørvisstovan setur. Umhvørvisstovan hevur tó, sum áður nevnt, eisini sett treytir um, at kanningar skulu gerast, fyri at staðfesta at hesi markvirði verða hildin, og at virkið skal hava so lokaðar skipanir sum gjørligt v.m. Umframt treytir til at um ampar verða av t.d. lukti frá virkseminum, skulu bøtandi atgerðir gerast. Hetta kundi t.d. verið at aðrar ella fleiri reinsihættir skuldu brúkast.

**Viðvíkjandi byggisamtykt**

Livilig kor hevði viðmerking um, at Umhvørvisstovan í Umhvørvisgóðkennningini vísir á at virkir, sum framleiða úrdráttir úr rávørum úr djórum herundir fiski, eru í bólki F í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina, og skulu tí hava umhvørvisgóðkenning. Livilig kor vísir á at nr. 7 undir bólki F er stjørnumerkt og kann tí fáa undantak frá umhvørvisgóðkenning. Livilig kor vísa harumframt á at ælaða nýggja virksemi hjá Varðanum Pelagic kemur undir bólk F nr. 9, sum er fóðurevnirverksmiðjur. Umhvørvisstovan hevur broytt orðingina í umhvørvisgóðkenningini so víst verður til bæði nr. 7 og 9. undir bólki F í fylgiskjalinum.

Livilig kor vísir eisini á undanfarna byggisamtykt fyri Tvøroyri, har eitt annað øki var lagt út til "turkivirkir av fiskafráskurði v.m. Hetta øki er ikki í nýggju byggisamtyktini. Í hesum føri er økið, har virkið er, sambært byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu lagt út sum øki D, sum er til

havnarendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey. Niðurstøðan hjá Livilig kor er, at ætlaða virksemið til protein- og lýsiframleiðslu ikki kann bólkast sum virksemi, ið hevur samband við fiskivinnu, og tí ikki er í trá við galdandi byggisamtykt. Umhvørvisstovan skilir tað sum at Livilig kor heldur, at virksemið skuldi verið á einum øki, sum er lagt út til turkivirkir av fiskafráskurði, men hetta øki er, sum sagt, ikki við í byggisamtyktini longur. Umhvørvisstovan kann einans fyrihalda seg til galdandi byggisamtykt, umframt verandi og ætlað virksemi hjá Varðanum Pelagic. Umhvørvisstovan metir, at virkið hjá Varðanum Pelagic kann bólkast sum virksemi, ið hevur samband við fiskivinnu, og metir Umhvørvisstovan tí at virksemi er í tráð við galdandi byggisamtykt.

**Viðvíkjandi endamálsorðing í Umhvørvisverndarlógini**

Livilig kor vísir í viðmerkingunum á endamálsorðingina í umhvørvisverndarlógini, og sigur at Umhvørvisstovan ikki hevur tikið atlit at heilsufrøðiliga grundaðum reglum av týdningi fyri umhvørvi, og heldur ikki valið av staðseting. Her sipar Livilig kor aftur her til trygdina viðvíkjandi ammoniakk í frystigoymsluni tá ið heilsufrøðiliga grundar reglur verður nevnt. Eins og greitt frá omanfyri hevur Umhvørvisstovan spurt inn til trygd og eftirlit viðvíkjandi ammoniakk frystigoymsluni og hevur fingið frágreiðing um hetta, og metir Umhvørvisstovan ikki at neyðugt er at seta fleiri treytir til køli- og frystigoymsluna, tí skipanin er góðkend og undir eftirlitið av øðrum myndugleika. Frystigoymslur eru ikki í fylgiskjalinum til umhvørvisverndarlógina sum serliga dálkandi virki og skulu tí ikki hava umhvørvisgóðkenning, men eru tær undir eftirlitið av Arbeiðs- og brunaeftirlitinum. Harumframt skal Umhvørvisstovan vísa á, at Livilig kor helst hevur misskilt orðingina *"heilsufrøðiliga grundaðum reglum"* í endamálsorðingini til umhvørvisverndarlógina. Umhvørvisverndarlógin er grundað á donsku miljøbeskyttelsesloven frá 1986, og í henni stendur *"hygiejnisk begrundede regler"* sum fevna um heilsu og sjúkufyribyrging. Umhvørvisstovan metir seg hava tikið atlit at hesum við m.a. at seta treytir til spillvatn og burturkast.

Viðvíkjandi staðseting, hevur Varðin Pelagic í umhvørvisárinsmetingini greitt frá, at onnur staðseting er umhugsað, men onnur staðseting ikki hevði givið tann ynskta framleiðsluflexibilitetin og hevði tað ført við sær at flutningur av restrávøru gjøgnum bygdina hevði hildið fram.

Livilig kor vísir í viðmerkingunum á §§ 1, 2 og 3 í umhvørvisverndarlógini og nevnir flestu undurpunkt til hesar paragrafar, og sum nevnt siga Livilig kor at Umhvørvisstovan ikki hevur tikið atlit til hesar ásetingar. Livilig kor nevnir stk. 1 og stk. 2 í § 3, men ikki stk. 3 í §3, er ásett at *"Tann, ið útinnir ella ætlar at byrja virki sum umrøtt í § 2, skal fremja tær til fyribyrgingar og forðingar av dálkingini neyðugu atgerðir og leggja til rættis rakstur virkisins á ein slíkan hátt, at virkið í minst møguligan mun elvir dálking."* Um virkið var staðsett longri burtur frá bústaðarøki, so hevði helst ikki verið neyðugt at fremja eins nógvar fyribyrgjandi atgerðir fyri at minka um dálking, serliga viðvíkjandi lukti og óljóði. Orsaka av at virki er staðsett nær bústaðarøki hevur Umhvørvisstovan kravt at simuleringar skuldu gerast av óljóði og lukti frá virkseminum, og eru treytir settar til at virkið skal fylgja øllum tilmælum, sum eru sett í frágreiðingum um simuleringar, fyri at tryggja at markvirði fyri lukt og óljóð verða hildin. Harumframt hevur Umhvørvisstovan, sum áður nevnt, sett treytir til at kanningar skulu gerast, fyri at staðfesta, at

hesi markvirði verða hildin. Umframt treytir um, at um ampar verða av t.d. lukti frá virkseminum, skulu bøtandi atgerðir gerast.

Livilig kor vísa eisini á kap. 9 í umhvørvisverndarlógini, sum viðvíkur kortlegging og planlegging. Víst verður til §54 sum ásetur at, *"við kortleggingini eftir §§ 48-50 sum grundarlagi ger landsstýrismaðurin eftir samráðing við kommunurnar eina ætlan fyri støðu av virki v.m., har vegna fyribyrging av dálking serlig støðukrøv mugu ásetast. Ætlanin skal fevna um økir til ídnaðar- og útbúningarvirkir og til spillvatnreinsiverk og burturkastfyritøkur."* Í avgerð um kæru í líknandi máli verður staðfest at kapitul 9 í umhvørvisverndarlógini ongantíð er settur í verk. At partar av kapittul 9 í kunngerð frá 1994 eru lagdir til heilsufrøðiligu starvsstovuna, nú Umhvørvisstovuna, at umsita, er ein greið ábending um, at landsstýrið hevur ynskt at fylgt løgtingsins vilja um at fáa hesa kort- og planlegging setta í verk, men samstundis verður viðurkent, at orka ongantíð hevur verið til at fremja nakra kortlegging. Tískil er heldur ongantíð gjørd nøkur dygdarætlan, ella nøkur ætlan fyri støðu av virkjum. Sostatt finnast ikki onnur planleggingaramboð enn býarskipanin og byggisamtyktin. Tað er kommunan, ið er planleggingarmyndugleiki og siðvenja hevur verið, og er, at kommunurnar taka støðu til staðseting av serliga dálkandi virkjum við grundarlagi í galdandi býarskipan og byggisamtykt, og hetta heldur Umhvørvisstovan seg til.

**Viðvíkjandi videoupptøkum**

Umframt viðmerkingarnar í skrivinum sendu Livilig kor eisini fleiri videoupptøkur úr grannalagnum til virkið og úr viðarlundini, sum Livilig kor siga *"vísa ljóðdálking frá verandi virki og vitna um, at P/F Varðin Pelagic ikki megnar at halda seg undir markvirðið fyri larm, sum nú er."* Í tveimum av teimum fimm videopptøkunum eru ljóðmátarar brúktir. Í fleiri av upptøkunum sæst eisini at skip liggja við kei við virkið hjá Varðanum Pelagic. Umhvørvisstovan spurdi tí, l um skip lógu við kai í øllum videoupptøkunum. Livilig kor svaraði, at í innsendu videobrotunum var helst talan um larm frá bæði virki og skipum samstundis. Sagt verður at tann dagliga ljóðdálkingini, tá ið skipini liggja inni, er sjálvsagt verri, enn tá ið ongi skip eru, men virkið larmar eisini einsamalt. Livilig kor sendi eisini trý videobrot aftrat, har onki skip lá við kai, fyri at vísa hvussu virkið ljóðar einsamalt. Tó var eingin desibel mátari við í hesum videoupptøkunum.

Umhvørvisstovan ásannar at í øllum videobrotunum hoyrist ljóð frá virksemi og/ella skipum sum liggja við kai. Í teimum báðum videobrotunum har ljóðmátari var brúktur, vístu mátingarnar umleið 64 og 70 desibel. Umhvørvisstovan metir tó ikki at man útfrá videobrotunum kann siga um óljóði frá virkseminum er yvir markvirði fyri óljóð bústaðarøki. Hetta tí at mátingar av óljóði frá einum virki skulu gerast sambært ávísum mannagongdum, umframt at markvirðini í umhvørvisgóðkenningini ikki eru løtuvirði. Markvirðini fyri ískoyti til óljóðstyngdina frá virkseminum hjá Varðanum Pelagic í bústaðarøki er millum 35 og 45 dB, og eru markvirðini sett sum miðal óljóðtyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði, sí treyt 4.6.5. Til dømis má miðalvirði fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) í einum bústaðarøki. Í bústaðar og blandaðum bústaðar- og miðstaðarøkjum skal miðalvirðið fyri tveir teir mest larmandi tímarnar um náttina (kl. 22-07) ikki fara upp um ávikavist 35 og 40 dB(A), men óljóðið kann ongantíð fara upp um ávikavist 50 og 55 desibel í tíðarskeiðinum frá 22-07.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

Í sambandi við umsóknina um umhvørvisgóðkenning eru ljóðkanningar gjørdar av verandi virksemi, umframt simuleringar av óljóði frá verandi og ætlaða nýggja virkseminum. Sambært frágreiðing frá Steingrund Aukustik vísa mátingar og útrokningar av óljóði frá verandi virksemi, at tá Gøtunes, sum er mett at verða mest larmandi skipið, liggur við kai, hevur óljóði verið omanfyri markvirði í bústaðarøki. Í frágreiðingini frá Steingrund Akustik verður sagt, at fyri at tryggja, at virksemi hjá Varðanum Pelagic lýkur markvirði fyri ískoyti av óljóði í framtíðini, er neyðugt at gera ávísar ábøtur. Í frágreiðingini eru eisini gjørd tilmæli um ábøtur, heruppií at ljóðdoyva skorsteinin á Gøtunesi í minsta lagi 10 dB. Umhvørvisstovan hevur sett treyt um at Varðin Pelagic í minsta lagi skal fylgja tilmælunum í fylgiskjali 11 *"Frágreiðing um óljóð frá virkseminum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri"* fyri at tryggja at óljóð frá virkinum er innan fyri ásettu markvirðini. Varðin Pelagic hevur upplýst, at skorsteinurin á Gøtunesi er ljóðdoyvdur.

Umhvørvisstovan kann ikki seta treytir til ljóðdoyving av skipum, sum liggja við bryggju við virkið, so sum ljóðdoyving av motori og skorsteini, men einans til virkið sjálvt og tað virksemið sum skipið hevur á virkinum, t.d. lossing og landing av vøru. Sostatt eru markvirðini fyri óljóð í umhvørvisgóðkenningini galdandi fyri óljóð frá lossing og landing av skipum, men ikki fyri óljóð frá skipsmotorum. Óljóði frá motorum frá skipum, sum liggja við bryggju verður reguleráð sambært felagskommunalari reglugerðin um óljóð frá skipum, sum Tvøroyrar kommuna varðar av.

Í sambandi við viðgerð av innkomnu viðmerkingunum til hoyringina fekk Umhvørvisstovan eisini fráboðan um dálking frá virkinum. Umhvørvisstovan hevur samskift við Varðan Pelagic um hetta, umframt at Umhvørvisstovan hevur verið á vitjan á virkinum. Tað verður ikki mett, at dálkingin kom frá súrløguframleiðsluni, sum hildið í fráboðanini. Møguliga kann dálkingin vera komin frá einum skipið, hetta er ikki staðfest, men Varðin Pelagic hevur bílagt nýtt skelti, sum sigur, at tað er strangliga bannað at sleppa RSW-tangavatni á sjógv meðan skipið liggur við kei. Umframt at farið verður oftari umborð at tosa við manningarnar um, at teir mugu ansa væl eftir, at onki fer á sjógv meðan skipið liggur við kei.

# 3. Virksemi og umhvørvisviðurskifti

P/F Varðin Pelagic tekur í høvuðsheitum ímóti uppisjóvarfiski og framleiðir pakkar við frystum heilum fiski, fløkum o.ø. Harafturat fer virkið at framleiða fiskaprotein, lýsi og súrløgu úr avskurði og fráskildum fiski frá verandi framleiðslu, og frá heilum lastum og pørtum av lastum, sum verða landaðar til virkið. Eisini kann virkið taka ímóti súrløgu frá skipum, sum framleiða súrløgu umborð.

Virkið hjá Varðanum Pelagic er á Havnarlagnum 11, matrikul nr. 493b, 493a, 887a og á nýggju útfyllingini eystan fyri verandi virki á Tvøroyri. Hetta er øki, sum sambært byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu er útlagt sum øki D, sum er lagt av til havnarendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey. Virkið hjá Varðanum Pelagic kann bólkast sum virksemi, ið hevur samband við fiskivinnu, og metir Umhvørvisstovan tí at virksemi er í tráð við byggisamtyktina.

**Ein nærri lýsing av virkseminum er í Fylgiskjali 1.**

Umhvørvisviðurskiftini verða lýst til tess at fáa greiðu á, hvørjar treytir skulu setast til virksemið. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftunum er mesti dentur lagdur á at minka um útlát av royki, dusti, lukti, larmi og spillivatni frá virkseminum, og at minka um árin frá dálking av olju, lýsi og kemikalium vegna óhapp. Metingin av umhvørvisviðurskiftum er grundað á framleiðsluorku um samdøgrið í Talvu 1.

Talva 1. Framleiðsluorka.

| Virksemi | Nøgd | Eind |
|---|---|---|
| Framleiðsla av frystum fiski | 1.200, harav 300 skorið | Tons um smd. |
| Framleiðsla av fiskaproteini og lýsi | 1.400 | Tons um smd. |
| Framleiðsla av súrløgu | 1.500 | Tons um smd. |

Virkið fer væntandi ikki at koyra við fullari framleiðslu alt árið, og verður framleiðslan tí helst væl minni enn framleiðsluorkan á virkinum. Í talvu 2. eru væntaðu framleiðslunøgdirnar av lidnari vøru um árið.

Talva 2. Væntaðar framleiðslunøgdir av lidnari vøru

| Virksemi | Nøgd | Eind |
|---|---|---|
| Framleiðsla av frystum fiski (flaps, fillets, heilur o.a.) | 115.000 | tons um árið |
| Framleiðsla av fiskaproteini | 40.000 | tons um árið |
| Framleiðsla av lýsi | 16.000 | tons um árið |
| Framleiðsla av súrløgu | 25.000 | tons um árið |

**Umhvørvisviðurskiftini eru lýst nærri í Fylgiskjali 2.**

# 4. Góðkenningartreytir

Sambært § 31 stk. 2 í umhvørvisverndarlógini skulu í góðkenningini verða nevndar ásettu treytirnar viðvíkjandi stovnsetan og rakstri virkisins.

Umhvørvisgóðkenningin er grundað á eina árliga framleiðsluorku sambært talvu 1 omanfyri.

Umhvørvisgóðkenningin fevnir um alt virksemið, sum er knýtt at virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri. Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

## 4.1. Almennar treytir

4.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð vera tøk á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og treytirnar í góðkenningini.

4.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í hesi umhvørvisgóðkenning, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika, hóskandi góðskugóðkenning og útgerð at gera arbeiðini.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

4.1.3. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av P/F Varðin Pelagic

4.1.4. Allar treytir eru eisini galdandi fyri virksemi hjá veitarum, meðan teir arbeiða á virkinum og fyri virksemi í sambandi við lossing og landing av skipum.

4.1.5. Um virkið verður broytt byggifrøðiliga ella rakstrarliga soleiðis at útlát frá virkinum kann økjast, skal virkið senda Umhvørvisstovuni skrivliga fráboðan um hetta frammanundan. Umhvørvisstovan viðger og tekur avgerð um neyðugt er við nýggjari góðkenning.

4.1.6. Um virkið skiftir eigara, broytir navn ella verður tikið av, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta.

4.1.7. Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampar ella skaða fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari ella brúkari tryggja at olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið, meðan virkið liggur stilt.

4.1.8. Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava skrivliga fráboðan um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av og tilfar, útgerð og annað, sum kann vera til ampar ella skaða fyri umhvørvið, verður beint burtur.

## 4.2. Innrætting og rakstur

4.2.1. Virkið skal vera rikið og staðsett sum sagt er frá í umsóknini og øðrum móttiknum tilfari.

4.2.2. Umhvørvisgóðkenningin er treytað av , at framleiðsluorkan í mesta lagi er:

- Framleiðsla av frystum fiski: 1.200 tons um samdøgrið
- Framleiðsla av fiskaproteini og lýsi: 1.400 tons um samdøgrið
- Framleiðsla av súrløgu: 1.500 tons um samdøgrið

4.2.3. Miðast skal eftir at brúka bestu tøku tøknina (BAT) í bæði framleiðslu og reingerð, soleiðis at virkið kann halda øll útlát so lág sum gjørligt.

4.2.4. Raksturin skal fara fram soleiðis, at øll økir, sum hoyra til virkið, eru ruddilig og rein.

4.2.5. Fiskur ella fiskaúrdráttir til framleiðsluna skulu vera so fesk sum møguligt, og virkast so skjótt sum tað er tekniskt gjørligt, so at virksemið elvir til so lítlan ampa av lukti sum gjørligt.

4.2.6. Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skal gerast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

4.2.7. Møguligir lekar ella óhapp við olju, lýsi, súrløgu, kemikalium ella rávøru skulu kunna haldast aftur á avmarkaðum økjum, og skulu kunna takast upp.

4.2.8. P/F Varðin Pelagic skal tryggja, at allir veitarar, sum arbeiða og virka inni á økinum, lúka treytirnar í hesi góðkenning.

## 4.3. Goymslur

4.3.1. Lýsi- og súrløgugoymslur skulu standa á lendi og í garði, sum heldur spilli ella lekum frá viðkomandi evnum aftur, svarandi til í minsta lagi nøgdina í størsta ílatinum.

4.3.2. Tangagarðar til lýsi skulu hava ventil til tøming av regnvatni, sum altíð er stongdur. Eftirlit skal vera við, tá ið tangagarðurin verður tømdur.

4.3.3. Tangagarðar við goymslutangum til súrløgu og meyrusýru kunnu hava opnan ventil við sjálvvirkandi læsing, um frárenslið fer í brunn við pH-sensori, so at ventilurin steingir, um ein leki hendur og pH broytist. Ávaringarskipan skal vera knýtt at pH sensorinum. Regluligt eftirlit skal vera við at sjálvvirkandi læsiskipanin virkar.

4.3.4. Tvískinnaðir tangar til gassolju skulu hava eftirlitsskipan, sum mátar trýstið millum skinnini. Trýstið millum skinnini skal avlesast í minsta lagi eina ferð um árið.

4.3.5. Ávaringarskipan skal vera í oljutangum, sum boðar frá, um oljunøgdin í tanganum minkar, uttan at nýtsla er. Regluligt eftirlit skal vera við ávaringarskipanini.

4.3.6. Miðast skal eftir, at allar rørleiðingar til olju, lýsi, og súrløgu skulu verða gjørdar soleiðis, at tað skal vera møguligt at hava eftirlit við lekum, og at savna olju, lýsi og súrløgu frá møguligum lekum.

4.3.7. Um P/F Varðin Pelagic fær ábending um, at olju-, lýsi- ella súrløgutangi ella rørleiðing til tanga lekur, skal felagið beinan vegin taka neyðug stig fyri at steðga leka og forða fyri, at støðan endurtekur seg. Møgulig umvæling skal gerast av felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðið.

4.3.8. Kemikalii skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslurnar.

4.3.9. Innandura kemikaliigoymslur skulu hava kemikaliitætt gólv uttan frárensl til spillvatnsleiðing og vera skipaðar soleiðis, at útlát vegna lekar ella óhapp kunnu haldast aftur í kemikaliutøttum garði, bakka ella tanga. Garðurin, bakkin ella tangin skal kunna rúma nøgdini, sum kann vera í tí størsta ílatinum á staðnum.

4.3.10. Innandura kemikaliigoymslur skulu hava luftskifti, sum hóskar til evnini í goymsluni.

4.3.11. Uttandura kemikaliigoymslur skulu standa á lendi og í garði, sum kann halda spilli ella lekum frá viðkomandi evnum aftur, svarandi til minst rúmdina á størsta ílatinum av viðkomandi kemikalii.

4.3.12. Uttandura kemikaliugoymslur skulu vera vardar móti vindi og regni, og skipaðar soleiðis at óvikomandi ikki sleppa at hesum.

4.3.13. Ávaringarskipan skal vera í lýsi- og meyrusýrutangunum, sum boðar frá, áðrenn tangarnir eru fullir og um nøgdin í tangunum minkar, uttan at nýtsla er. Regluligt eftirlit skal vera við ávaringarskipanini.

4.3.14. Allar ávaringarskipanir skulu boða frá, t.d. við ljóði ella ljósi, sum hoyrist ella sæst við tangarnar, í eftirlitsrúmi ella um telefon, so mikið tíðliga, at tíð er til at seta tiltøk í verk, áðrenn dálking stendst av virkseminum.

4.3.15. Tangar til rávøru skulu antin standa inni í rúmi við tøttum gólvi, ella uttandura á tøttum lendi og við hóskandi garði.

4.3.16. Aðrar goymslur uttandura skulu skipast soleiðis, at vørur, tilfar ella útgerð ikki verða tikin av vindi.

4.3.17. Flótandi og føst evni skulu goymast í íløtum , sum hóska til endamáli t.d. UN-góðkend, og sum er merkt soleiðis, at tað sæst, hvat er í.

## 4.4. Spillluft

*Roykur frá oljufýringum og spjaðing av roykinum*

4.4.1 P/F Varðin Pelagic skal brúka bestu tøku tøknina til at framleiða damp og hita til framleiðsluna, har uppi í tøkni, sum hevur so lágt útlát sum gjørligt.

4.4.2 Brennievni til ketlar kann í mesta lagi innihalda 0,5% v/v av svávul, treyta av at aðrar ásetingar í lóggávu ikki seta strangari krøv.

4.4.3 Markvirði fyri dálkandi evni í roykinum[4] frá framleiðsluni, ketlum og turku og B-virði fyri somu evni:

| Evni | Markvirði fyri útlát | B-virði | Metodudatablað nr. |
|---|---|---|---|
| Dust < 10 µm | 100 mg/Nm$^3$, 10% O2 | 0,08 mg/Nm$^3$ | MEL-02 |
| $NH_3$ | 500 mg/Nm$^3$, 10% O2 | 0,3 mg/Nm$^3$ | MEL-24 |
| $H_2S$ | 5 mg/Nm$^3$, 10% O2 | 0,001 mg/Nm$^3$ | MEL-23 |
| DMA (dimethyalmin) | 100 mg/Nm$^3$, 10% O2 | 0,04 mg/Nm$^3$ | MEL-20 |
| TMA (trimethylamin) | 100 mg/Nm$^3$, 10% O2 | 0,008 mg/Nm$^3$ | MEL-20 |
| CO | 165 mg/Nm$^3$ turt gass, 3% | 1 mg/Nm$^3$ | MEL-06 |
| $NO_x$ sum $NO_2$ | 180 mg/Nm$^3$ turt gass, 3% | 0,125 mg/Nm$^3$ | MEL-03 |

[i]Nm$^3$: ein m$^3$ av gassi við 0°C, 101,3 kPa, turrur roykur. Úrslitini frá kanningum av royki skulu standardiserast til 3% $O_2$.
[ii] Metodublað nr. hjá Miljøstyrelsens Referencelaboratorium for måling af emissioner til luften, ella tilsvarandi mannagongd.

*Dust*

4.4.4 P/F Varðin Pelagic skal tryggja, at ampar av dusti frá framleiðslu og avskiping av fiskaproteini verða avmarkaðir mest møguligt, t.d. við at allar framleiðsluskipanir og bygningar eru so dusttættir sum gjørligt, og at allar hurðar og øll op eru afturlatin í mest møguligan mun.

*Luktur*

4.4.5 P/F Varðin Pelagic skal brúka bestu tøku tøkni at reinsa ella viðgera alla luft, sum hevur verið brúkt til framleiðslu av fiskaproteini, lýsi og súrløgu.

4.4.6 P/F Varðin Pelagic skal tryggja, at ampar av lukti frá uppskiping av fiski, framleiðslu av fiskaproteini og lýsi, og avskiping av fiskaproteini verða avmarkaðir mest møguligt, t.d. við at brúka so lokaðar skipanir sum gjørligt og at reinsa ella viðgera luft, sum hevur verið ein partur av framleiðsluni.

4.4.7. Markvirði fyri lukt roknast sum hægsta mánaðarliga 99% tímamiðalvirðið yvir 10 ár. Ískoyti til luktútlát frá punktkeldum á virkinum má ikki fara upp um hesi mørk:

[4] Spillluft er roykur frá ketlum og turku, luft sum hevur verið beinleiðis í sambandi við framleidda vøru, luft frá myllum, cyklonum, skrubbarum og tilíkt.

| **Øki** | **Interval fyri vegleiðandi luktmarkvirði** $ou_E$**/m³ |
|---|---|
| Bústaðarøki* | 1,0 $ou_E/m^3$ |
| Stovnar og rekreativ øki | 1,0 $ou_E/m^3$ |
| Vinnu og ídnaðarøki | 2,0 $ou_E/m^3$ |

*Bústaðarøki umfatar eisini blandað bústaðar og vinnu øki, summarhúsøki, kontór og líknandi.
** European Odour Unit er eind at máta lukt, sum verður brúkt í flestu londum í Europa.

4.4.8 Varðin Pelagic skal í minsta lagi fylgja tilmælunum í fylgiskjali 14: OML-Notat "Vurdering af luft- og lugtemmissionsbidrag fra planlagte fiskemel og olieanlæg, Tvøroyri Suderøy" fyri at tryggja at markvirði til útlát til luft frá virkinum er innanfyri markvirðini í treyt 4.4.3. og 4.4.7.

4.4.9 Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttan fyri øki virkisins.

4.4.10 Um ampar vera av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 4.5. Spillvatn

4.5.1 Varðin Pelagic skal brúka bestu tøku tøkni at reinsa spillivatni[5] frá virkseminum soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða hildin aftur.

4.5.2 Vatn úr kølitangum á skipum, ið landa til virkið, skal antin leiðast ígjøgnum framleiðsluskipanina ella reinsiskipanina hjá Varðanum Pelagic ella pumpast umborð aftur í tangarnar á skipinum.

4.5.3 Varðin Pelagic skal hava skrivligar mannagongdir fyri regluliga at kunna skipaleiðslur um, at tangavatn ikki skal pumpast út, fyrr enn skip eru komin út á streymasjógv. Umhvørvisstovan kann biðja um at fáa avrit av hesum manna-gongdum.

4.5.4 Spillvatnið skal ígjøgnum eina reinsiskipan, áðrenn tað verður leitt á sjógv. Reinsiskipanin skal hava eitt sáld, har meskavíddin í mesta lagi er 1 mm og feittskiljarar, flotatiónstanga ella annað har spillvatnið verður hildið aftur í minsta lagi so leingi at feitt verður skilt nóg væl burturúr, soleiðis at ásetingarnar í treyt 4.5.16. vera hildnar.

4.5.5 Um varðin Pelagic kann skjalprógva at partar av spillvatninum frá framleiðsluni halda markvirðini, sum eru ásett í 4.5.16, kann Varðin Pelagic søkja um at fáa undantak fyri, at hesin partur av spillvatninum skal ígjøgnum reinsiskipan, áðrenn tað verður leitt á sjógv.

4.5.6 Alt regnvatn ella spulivatn, sum kann innihalda mineralska olju ella feitt, skal gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum botnfellingartanga og oljuskiljara við sjálvvirkandi læsing og ávaring ella aðra hóskandi skipan.

4.5.7 Nýtsla av reingerðarevnum, sóttreinsingarevnum og evnum til at fora gróðri, skal avmarkast mest møguligt og miðast skal eftir at nýta tey mest umhvørvisvinarligu evnini, og í minst møguligan mun nýta evni, sum hava langa tíð um at verða niðurbrotin, hópast upp í livandi verum ella eru eitrandi.

4.5.8 Sýnistøkubrunnur skal vera aftan á, at spillivatn frá øllum framleiðslueindum hevur verið gjøgnum hóskandi reinsiskipan.

---

[5] Spillivatn er vatn, sum verður brúkt til at spula og gera reint við, og vatn sum hevur verið beinleiðis í sambandi við fisk, framleidda vøru, burturkast ella er dálkað av øðrum ávum.

4.5.9 Frárenning frá virkinum má ikki bera brá av olju, feitti ella aðrari dálking.

4.5.10 Spillvatn skal leiðast í kommunala útleiðing, sum lýkur treytirnar í kunngerðini um spillivatn, ella leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingarnar hvørki elva til uppsavning av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

4.5.11 Munnin á ætlaðu nýggju spillivatnsleiðingin, sum framleiðsluvatnið frá virkseminum verður leitt í, skal staðsetast soleiðis, at frástøðan frá munnanum er í minsta lagi 1 km frá aliøki A-15. Harumframt skal Varðin Pelagic tryggja, at rákið, har munnin á spillivatnsleiðingini verður lagdur, ikki rekur beint ímóti aliøki A-15.

4.5.12 Tá ið Varðin Pelagic hevur gjørt eina meting av, hvar munnin frá spillvatnsleiðingin skal staðsetast, skal ein frágreiðing sendast Umhvørvisstovuni, har greitt verður frá hvørjar kanningar eru gjørdar og grundgivið verður fyri valdu staðsetingini. Við støði í frágreiðingini og øðrum tilfari, tekur Umhvørvisstovan støðu til um staðsetingin kann góðkennast.

4.5.13 Munnin á øllum spillivatnsútleiðingum skal í minsta lagi vera ein metur undir størstu fjøru.

4.5.14 Elvir spillivatnsútleiðing til uppsavning av evnum ella tilfari í sjóvarmálanum ella á botni, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing. Umhvørvisstovan skal kunnast um ætlaðar atgerðir.

4.5.15 Útleiðingar á sjógv skulu vera so fáar sum gjørligt.

4.5.16 Spillivatnið skal halda hesi markvirði:

| **Evni** | **Áseting** | **Kanningarháttur** |
|---|---|---|
| Suspenderað evni | 300 mg/L | DS/EN 872:2005* |
| Botnfelt evni | 10 ml/L | DS 233:2007* |
| Fiti og olja, lívrunnið | 100 mg/L | DS/R 208* |
| COD | 1,5 kg/tons feskfisk | DS/217* |
| Olja, mineralsk | 10 mg/L | DS/R 208* |
| pH | 6-10 | DS/EN ISO 10523:2012* |

* ella tilsvarandi mannagongd

## 4.6. Óljóð, ristingar og ljós

4.6.1 Varðin Pelagic skal brúka bestu tøku tøknina og bestu mannagongdir fyri at avmarka og doyva óljóð frá virkseminum, sum t.d. frá opum, har luft verður sogin inn ella blást út, viftum, motorum v.m.

4.6.2 Varðin Pelagic skal í minsta lagi fylgja tilmælunum í fylgiskjali 11 *"Frágreiðing um óljóð frá virkseminum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri"* fyri at tryggja at óljóð frá virkinum er innanfyri markvirðini í treyt 4.6.7. – 4.6.9.

4.6.3 Varðin Pelagic og beinleiðis atknýttir undirveitarar skulu brúka so ljóðveik og ljóðmeinaleys arbeiðstól og flutningsfør sum gjørligt.

4.6.4 Varðin Pelagic hevur ábyrgd av, at bil- og trukkførarar arbeiða so ljóðskynsamt sum gjørligt.

4.6.5 Varðin Pelagic skal hava skrivligar mannagongdir fyri at kunna skipaleiðslur um at arbeiða so ljóðskynsamt sum gjørligt.

4.6.6 Tá ið tól verða skift út, skal miðast eftir at larmandi tól verða skift út við tól, sum larma minni.

4.6.7 Ískoytið til óljóðtyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá Varðanum Pelagic og beinleiðis avleiddum virksemi, má ikki fara upp um hesi mørk:

| **Dagur** | **Klokkutíð** | **Tíma r** | **Øki 1 dB(A)** | **Øki 2 dB(A)** | **Øki 3 dB(A)** | **Øki 4 dB(A)** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Óljóðtyngdin: Óljóðstøði, mált sum orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark
Tímar: Miðal óljóðtyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði, má ikki fara upp um markvirðið, t.d. má miðalvirði fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) fyri Øki 4.
Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram
Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram
Øki 3: Blandað bústaðar- og Miðstaðarøki
Øki 4: Bústaðarøki

4.6.8 Í øki 3 og 4 skal ískoyti til óljóðstyngdina frá virkinum í tíðarskeiðinum kl. 22-07 ongantíð fara meira enn 15 dB(A) upp um markvirðini nevnd í talvu 4.6.7.

4.6.9 Markvirði fyri lágfrekvent óljóð og infraljóð sum harðasta tíðarbil á 10 minuttir, mátað innandura eru í talvu 6 niðanfyri.

| **Øki** | **Tíðarskeið** | **10-160 Hz dB(A)** | **<20Hz dB (G)*** |
|---|---|---|---|
| Í bústøðum, á stovnum o. l. | 18.00 – 7.00 | 20 | 85 |
| Í bústøðum, á stovnum o. l. | 07.00 - 18.00 | 25 | 85 |
| Á skrivstovum,frálæruhølum og øðrum líknandi ljóð-viðkvæmum rúmum | - | 30 | 85 |
| Í øðrum rúmum á virkjum | - | 35 | 90 |

*) dB(G): G-vigað infraljóðstøði

4.6.10 Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur ampar av ristingum við sær.

4.6.11 Nýtsla av ljósum skal ikki hava ampar við sær.

4.6.12 Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 4.7. Burturkast

4.7.1. Alt burturkast frá virkseminum skal handfarast og skiljast sambært galdandi lóggávu og krøvum frá móttakara.

4.7.2. Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

4.7.3. Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

4.7.4. Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum ella krøvum frá móttakara, og skal goymast í týðiliga merktum íløtum, sum tola burturkastið, sum skal í.

4.7.5. Íløt við serliga dálkandi burturkasti, sum standa úti, skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki, har óviðkomandi ikki hava atgongd.

4.7.6. Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu vera sett og tryggja soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

## 4.8. Áfylling av oljutangum

4.8.1. Greiðar mannagongdir skulu vera fyri fylling av oljutangum, sum m.a. innihalda ábyrgdarbýti, útgerð, eftirlitslistar og annað av týdningi.

4.8.2. Ábyrgdarpersónar fyri áfylling skulu vera bæði hjá móttakara og veitara, meðan fylt verður. Hesir skulu kunna samskiftað beinleiðis, meðan fylt verður.

4.8.3. Bilar, sum koma við olju, skulu standa inni á økinum hjá Varðanum Pelagic á oljutøttum undirlagi við frárensli til reinsiskipan, meðan olja verður fylt á tangarnar.

4.8.4. Innihaldið í oljutanganum skal vera mált, áðrenn áfylling byrjar, og gerast skal greitt, hvussu nógv olja skal fyllast á.

4.8.5. Áðrenn áfylling byrjar, skal kannast, um øll rør og allar slangur eru trygg, og at allir ventilar eru í rættari støðu.

4.8.6. Áfylling skal steðgast beinanvegin, um tekin eru um, at áfylling ikki fer fram trygt, forsvarliga og sambært avtalaðum mannagongdum, t.d. um radiosamband millum veitara og móttakara gerst óvirkið, tekin eru um yvirrenning, skaða á útgerð, ella annað óvæntað.

4.8.7. Hóskandi útgerð at avmarkað og basa dálking skal vera á staðnum.

## 4.9. Grótfylla út á sjógv

4.9.1. Um Varðin Pelagic fyllir grót út á sjógv, har væntast kann, at tað er dálkað við Nonel leidningsleivdum v. m. ella tilsvarandi plastleivdum, skal Varðin Pelagic tryggja, at møguligar Nonel-leidningsleivdir v.m., sum verða skolaðar leysar av grótinum til útfyllingina, verða hildnar aftur so nær útfyllingini sum gjørligt, t.d. við eini forðing.

4.9.2. Um flótandi forðing verður brúkt, skal Varðin Pelagic áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina greiða og grundgivna ætlan fyri, hvørja og hvussu stóra forðing ætlanin er at brúka, hvussu hon tryggjar, at Noel leidningsleivdir v.m. ikki reka burtur og hvussu plastleivdir innan fyri forðingina verða tiknar upp.

4.9.3. Varðin Pelagic skal regluliga savna Nonel leidningsleivdir v.m., sum verða hildnar aftur innan fyri forðingina, og skráseta nøgdina av hesum í vekt.

4.9.4. Varðin Pelagic skal regluliga fylgja við, tó í minsta lagi tvær ferð um vikuna, meðan arbeiðið fer fram og upp til ein mánað eftir at arbeiðið er steðgað, um Nonel-leidningsleivdir v.m. reka upp á land. Varðin Pelagic skal savna og burturbeina hesar til móttakara av burturkasti, og skráseta nøgdina av hesum í hóskandi vekteind.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

4.9.5. Um Varðin Pelagic brúkar aðra mannagongd enn forðing at tryggja, at møguligar Nonel- leidningsleivdir v.m., sum kunnu verða uppi í grótinum, verða hildnar aftur, skal Varðin Pelagic somuleiðis áðrenn arbeiðið byrjar, gera eina greiða og grundgivna ætlan fyri, hvussu hetta verður gjørt.

4.9.6. Varðin Pelagic skal savna Nonel leidningsleivdir v.m., uppi á útfyllingarøkinum eftir hvønn arbeiðsdag, og skráseta nøgdina av hesum í hóskandi vekteind.

4.9.7. Varðin Pelagic skal skjótast gjørligt kunna Umhvørvisstovuna um óvanlig viðurskifti, sum hava ella kunnu føra týðandi dálking við sær.

4.9.8. Varðin Pelagic sendir Umhvørvisstovuni tíðarætlan og mannagongdir viðvíkjandi punktunum 4.9.2 til 4.9.7 í so góðari tíð, at møguligar broytingar kunnu gerast, áðrenn arbeiðið byrjar.

4.9.9. Um óhapp ella annað førir við sær, at forðingin ikki virkar sum ætlað, skal einki grót fyllast út fyrr enn forðingin er komin í rættlag aftur.

4.9.10. Verður dálking staðfest av spreingileiðningum í nærumhvørvinum, kann Umhvørvisstovan krevja, at Varðin Pelagic skipar fyri rudding.

## 4.10. Tilbúgving móti dálking vegna óhapp

4.10.1. Varðin Pelagic skal gera eina váðameting av óhappum, sum kunnu føra til brádliga økta dálking.

4.10.2. Út frá váðametingini skal Varðin Pelagic gera eina tilbúgvingarætlan við mannagongdum at fyribyrgja óhappum og sum kunnu steðga og avmarka útlátið á rættan og skjótan hátt um óhapp skuldi hent.

4.10.3. Henda óhapp, sum hava útlát við sær, skal Varðin Pelagic beinan vegin seta tiltøk í verk fyri at støðga útlátinum og gera tað, sum gerast kann fyri at taka dálkingina uppaftur.

4.10.4. Umhvørvisstovan[6] skal kunnast um óhapp, sum hava brádliga økta dálking við sær, skjótast gjørligt. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk, tiltøk til at basa og taka upp eftir bráðfeingis dálking og tiltøk, sum eru sett í verk fyri at tryggja, at líknandi óhapp ikki kemur fyri aftur, sendast Umhvørvisstovuni.

4.10.5. Avrit av tilbúgvingarætlan skal sendast til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 12 mánaðir eftir at góðkenningin er lýst.

## 4.11. Innaneftirlit og kanningar

4.11.1. Varðin Pelagic skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

---

[6] Um dálkingaróhapp førir til, at dálkandi evni fer út um virkisøkið, skal í minsta lagi løgreglan og møguliga MRCC (um olja fer á sjógv) hava boð um tað.

*Umhvørvisstýriskipan*

4.11.2. Varðin Pelagic skal seta í verk eina umhvørvisstýriskipan, sum er samsvarandi viðurkendum skipanum, so sum ISO 14001, og sum hevur mannagongdir til stýring av virksemi, dálkingaravmarkandi tiltøkum, viðlíkahaldi, eftirliti, skráseting o.a. í seinasta lagi seks mánaðir eftir at útbyggingin er liðug.

4.11.3. Um umhvørvisstýriskipanin ikki er sertifiserað, skal Varðin Pelagic hava skipað ein innanhýsis skoðanarbólk viðvíkjandi umhvørvisviðurskiftum, soleiðis at skipanin verður eftirmett í  minsta lagi einaferð um árið.

4.11.4. Um umhvørvisstýrisskipanin ikki verður sertifiserað, kann Umhvørvisstovan krevja avrit av henni og árligu eftirmetingini og áseting av nýggjum málum einaferð um árið.

*Goymslur og útgerð*

4.11.5. Varðin Pelagic skal hava mannagongdir til regluligt eftirlit við oljutangum, oljurørleiðingum og oljufýringum fyri at tryggja, at krøvini til útlát verða hildin og at óhapp ikki henda.

4.11.6. Varðin Pelagic skal hava mannagongdir til regluligt eftirlit við lýsi- og súrløgutangum og tilhoyrandi rørleidiningum, fyri at tryggja, at krøvini til útlát verða hildin og at óhapp ikki henda.

4.11.7. Varðin Pelagic skal hava mannagongdir til regluligt eftirlit við vatnnøgdini í tangagarðinum til lýsi, tó í minsta lagi annan hvønn dag. Tá tangagarðurin er meira enn ein triðingsfullur av vatni, skal hann tømast. Varðin Pelagic hevur eftirlit við tømingini.

4.11.8. Varðin Pelagic skal hava mannagongdir til regluligt eftirlit, við reinsiskipanum, sjálvvirkandi ventilum og øðrum sjálvvirkandi skipanum, alarmskipanum og uppsamlingarbrunnum, so hesi virka sambært forskriftunum, í minsta lagi einaferð um árið.

*Spillluft*

4.11.9. P/F Varðin Pelagic skal kanna roykin fyri dálkandi evnini, sum eru nevnd í treyt 4.4.3 tvær ferðir um árið, í trý ár. Eftir hesi trý árini, tekur Umhvørvisstovan støðu til, um krøvini til kanningar av royki skulu broytast.

4.11.10. Varðin Pelagic skal kunna skjalprógva, at B-virðini fyri luft verða hildin við OML-útrokningum út frá innihaldinum í roykinum, tá ið hann er mestur, sambært treyt 4.4.3.

4.11.11. Miðast skal eftir at allar kanningar av dálkandi evnum í treyt 4.11.9. skulu gerast við hægsta útlát til luft. Allar kanningar skulu gerast av akkrediteraðum felagi.

*4.11.12.* Kanningar av roykinum skulu gerast sambært metodublað nr. há hjá *Miljøstyrelsens Referencelaboratorium for måling af emissioner til luften*, sum tilskilað í treyt 4.4.3, ella tilsvarandi mannagongd.

*Dust og luktur*

4.11.13. Varðin Pelagic skrásetir óvanlig útlát av dusti ella lukti.

4.11.14. Varðin Pelagic skal skráseta klagur um dust og lukt við øllum viðkomandi upplýsingum.

4.11.15. Varðin Pelagic skal boða grannum og Umhvørvisstovuni frá óvanligum lukti og dusti og atgerðum í sambandi við hetta.

4.11.16. Varðin Pelagic skal hava eina umsitingarætlan fyri luktampar og skal Umhvørvisstovan hava avrit av hesi í seinasta lagi 12 mánaðir eftir at góðkenningin er lýst.

4.11.17. Varðin Pelagic skal kunna skjalprógva, at virkið heldur treytirnar um útlát av lukti.

*Spillvatn*

4.11.18. Varðin Pelagic skal máta og skráseta, hvussu nógv og hvar spillvatn verður leitt út.

4.11.19. Varðin Pelagic skal í trý ár eftir, at góðkenningin er komin í gildi, taka í minsta lagi 6 nøgdarproportional samdøgurssýni av spillvatninum frá framleiðsluni um árið. Sýnini skulu takast so javnt býtt ígjøgnum framleiðslu sesongina sum gjørligt, og kannast fyri innihald nevnt í 4.5.16. Sýnini skulu takast eftir at spillivatn frá øllum framleiðslueindum hevur verið gjøgnum hóskandi reinsiskipan.

4.11.20. Um Varðin Pelagic fær undantak frá kravi um at leiða part av spillvatninum gjøgnum reinsiskipan áðrenn tað verður leitt á sjógv sambært treyt 4.5.5, skal Varðin Pelagic í trý ár eftir at góðkenningin er komin í gildi, taka í minsta lagi 6 nøgdarproportional samdøgurssýni av hesum parti av spillvatninum frá framleiðsluni um árið. Sýnini skulu takast so javnt býtt ígjøgnum framleiðslu sesongina sum gjørligt, og kannast fyri innihald nevnt í 4.5.16

4.11.21. Trý ár eftir, at góðkenningin er komin í gildi, kann Varðin Pelagic søkja um at fáa títtleikan av sýnistøkum og kanningum broyttan. Við umsóknini skal vera frágreiðing um gongdina seinastu trý árini.

4.11.22. Við støði í frágreiðingini og øðrum tilfari, tekur Umhvørvisstovan støðu til, um tað framvegis er neyðugt, at taka sýni av spillivatninum ella um títtleikin av sýnistøkunum skal broytast.

4.11.23. Um Varðin Pelagic metir, at onnur dálkandi evni kunnu vera í spillvatninum enn tey, sum eru nevnd í 4.5.16, hevur virkið skyldu til at kanna hesi og boða Umhvørvisstovuni frá úrslitunum í seinasta lagi ein mánað eftir, at kanningar-úrslitini eru tøk.

4.11.24. Umhvørvisstovan kann áseta aðrar sýnistøkutíttleikar og aðrar parametrar fyri sýni av spillvatninum.

4.11.25. Varðin Pelagic skal gera eina kanning sum lýsir støðuna á botninum kring munnan á nýggju spillvatnsleiðingini, tá ið staðseting er endaliga staðfest, og áðrenn útleiðingin verður tikin í nýtslu. Úrslitini skulu skjalprógvast við myndum, video ella á annan hóskandi hótt, umframt at ein kanning skal gerast av djóralívinum kring útleiðingina, um talan er um bleytan botn. Djóralívskanning kann gerast eftir sama leisti sum í punkti 2.7.3.3. í vegleiðing 21/2023 frá Umhvørvisstovuni. Kanningarætlan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

4.11.26. Fyrstu trý árini eftir at útleiðingin er tikin í nýtslu, kannar Varðin Pelagic um botnurin kring munnan á nýggju spillvatnsleiðingini er sjónliga dálkaður og skjalprógvar hetta við myndum, video ella á annan hóskandi hótt. Kanningarnar skulu gerast ímóti endanum á framleiðslusesongini, tá virkið hevur koyrt við fullari framleiðslu, við verandi og nýggja virkseminum. Kanningin skal gerast eftir sama leisti, og á somu støðum sum kanning sambært treyt 4.11.25. Kanningarætlan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.

4.11.27. Varðin Pelagic skal á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina frágreiðing við úrslitum frá botnkanningunum. Frágreiðingin skal samanbera úrslitini frá kanningunum sambært punktunum 4.11.25. og 4.11.26.

4.11.28. Eftir trý ár tekur Umhvørvisstovan støðu til, um neyðugt er við fleiri kanningum, tiltøkum ella bøtandi atgerðum.

*Óljóð, ristingar og ljós*

4.11.29. Varðin Pelagic skal skráseta klagur um óljóð við øllum viðkomandi upplýsingum.

4.11.30. Varðin Pelagic skal gera eina kanning av óljóðsstøðinum frá samlaða virkseminum á virkinum. Kanningin skal gerast av veitara, sum hevur førleika og útgerð til at gera arbeiðið og vera tøk í seinasta lagi eitt ár eftir at nýggja virksemið við fiskaprotein- og lýsifremleiðslu er byrjað. Kanningin skal gerast meðan virksemið er uppá tað mesta. Frágreiðing við úrslitinum frá kanningini og meting av úrslitinum og skal sendast Umhvørvisstovuni skjótast gjørligt eftir at úrslitini frá kanningini eru tøk.

4.11.31. Um ampar vera av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.

4.11.32. Umhvørvisstovan kann áleggja Varðanum Pelagic at gera nýggjar kanningar av ljóðstøðinum, eftir at møguligar ábøtur eru gjørdar ella týðandi útgerð er skift.

*Kanningar og frágreiðingar*

4.11.33. Varðin Pelagic ger eina kanningar- og eftirlitskrá, sum lýkur treytirnar í umhvørvisgóðkenningini fyrst í hvørjum ári og sendir Umhvørvisstovuni eitt avrit av henni í seinasta lagi 1. februar.

4.11.34. Varðin Pelagic eftirmetir øll eftirlit og allar kanningar og ger frágreiðing um eftirmetingarnar fyri hvørt ár. Umhvørvisstovan kann biðja um at síggja hesar eftirmetingar.

4.11.35. Mannagongdir, rakstrarskrásetingar, kanningarúrslit og frágreiðingar skulu goymast í fimm ár og vera atkomuligar hjá eftirlitsmyndugleikanum.

4.11.36. Um ein av omanfyri nevndu kanningum ella frágreiðingum vísir, at Varðin Pelagic ikki heldur ásetingarnar í hesi góðkenning, skal Varðin Pelagic í seinasta lagi eina viku eftir at tílík kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni avrit av hesum. Í seinasta lagi ein mánað eftir at kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni ætlan við bøtandi atgerðum.

4.11.37. Umhvørvisstovan kann krevja, at Varðin Pelagic ger serligar kanningar ella mátingar, um stovnurin hevur ábending um serliga dálking ella ampar. Um kanning ella máting vísir dálking ella ampar skal virkið seta bøtandi tiltøk í verk, sum Umhvørvisstovan kann góðtaka.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

## 4.12. Rakstrarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

4.12.1. Varðin Pelagic skal skráseta hesar upplýsingar:

- Móttiknar rávørunøgdir og TVN- innihald.
- Nøgdir av frystum vørðum, fiskaproteini, -lýsi og -súrløgu.
- Nýtsla av kemikalium, herundir reingerðarevni og sóttreinsingarevni.
- Framleiðsludagar, luftnýtslu (skorsteinur) ($m^3$/ár), vatnnýtsla ($m^3$/ár), sjógvnýtsla ($m^3$/ár), elnýtsla (kWh/ár), oljunýtsla (tons/ár).
- Nøgdir og slag av burturkasti, herundir vandamikið burturkast og evja úr reinsiskipanum v.m., og tilhoyrandi móttakari.
- Eftirlit og viðlíkahald av reinsiskipanum til framleiðsluluft, -vatn og –sjógv.
- Eftirliti av tangum til brennievni og tilhoyrandi rørskipanum, lýsi-, súrløgu- og rávørutangum og tilhoyrandi viðlíkahald.
- Eftirlit við regnvatni í tangagørðum.
- Eftirlit við oljufýringum
- Kanningarúrslit av tiknum sýnum av spillvatni og royki.
- Dálkandi óhapp, orsøk og frágreiðing um árin og upprudding v.m., og hvat verður gjørt fyri, at fyribyrgja slíkum óhappum.

4.12.2. Varðin Pelagic ger hvørt ár eina umhvørvisfrágreiðing sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingunum
- uppgerð av samlaðum útláti av kannaðum evnum
- kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrslitum
- dálkandi óhapp,
- frágreiðing um umhvørvisskipan og umhvørvisviðurskifti,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a.

sum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

# 5. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til landsstýriskvinnuna saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdag.

# 6. Fylgiskjal 1. Lýsing av virkseminum

## 6.1. Staðseting

Virkið hjá Varðanum Pelagic er á Havnarlagnum 11, matrikul nr. 493b, 493a, 887a og á nýggju útfyllingini eystan fyri virkið á Tvøroyri. Hetta er øki, sum sambært byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu er útlagt sum øki D. Øki D er havnarøki, sum er lagt av til havnarendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey. Virkið hjá Varðanum Pelagic kann bólkast sum virksemi, ið hevur samband við fiskivinnu, og metir Umhvørvisstovan tí at virksemi er í tráð við byggisamtyktina.



Mynd 1. Verandi virki hjá Varðanum Pelagic.




Mynd 2. Nýggi parturin til fiskaprotein- og lýsiframleiðslu sunnan- og eystan fyri verandi virki hjá Varðanum Pelagic.

## 6.2. Framleiðsla

P/F Varðin Pelagic tekur í høvuðsheitum ímóti uppisjóvarfiski, og framleiðir pakkar við frystum heilum fiski, fløkum o.ø. Harafturat fer virkið at framleiða fiskaprotein, lýsi og súrløgu úr avskurði og fráskildum fiski frá verandi framleiðslu, og frá heilum lastum og pørtum av lastum, sum verða landaðar til virkið. Harumframt kann virkið taka ímóti súrløgu frá skipum, sum framleiða súrløgu umborð.

Metingin av umhvørvisviðurskiftum er grundað á framleiðslunøgdirnar í Talvu 1.

**Talva 1.** Framleiðsluorka.

| Virksemi | Nøgd | Eind |
|---|---:|---:|
| Framleiðsla av frystum fiski | 1.200, harav 300 skorið | Tons um smd. |
| Framleiðsla av fiskaproteini og lýsi | 1.400 | Tons um smd. |
| Framleiðsla av súrløgu | 1.500 | Tons um smd. |

Virkið fer væntandi ikki at koyra við fullari framleiðslu alt árið, og verður framleiðslan tí helst væl minni enn framleiðsluorkan á virkinum. Í talvu 2. eru væntaðu framleiðslunøgdirnar av lidnari vøru um árið.

**Talva 2.** Væntaðar framleiðslunøgdir av lidnari vøru

| Virksemi | Nøgd | Eind |
|---|---:|---:|
| Framleiðsla av frystum fiski (flaps, fløk, heilur o.a.) | 115.000 | tons um árið |
| Framleiðsla av fiskaproteini | 40.000 | tons um árið |
| Framleiðsla av lýsi | 16.000 | tons um árið |
| Frameliðsla av súrløgu | 25.000 | tons um árið |

### *Landing av fiski*

Fiskurin kemur beinleiðis til virkið frá skipum, sum liggja við kei. Skipið pumpar fiskin inn í eitt móttøkukar á virkinum, og haðani fer fiskurin á flutningsbondum til innviging. Fiskurin verður skildur eftir stødd, har nakað verður fryst heilt, meðan nakað verður skorið til flak og síðani fryst.

Umborð á skipunum er fiskurin í tangum við køldum sjógvi (sonevndum RSW tangum), soleiðis at fiskurin er umleið -1,5°C tá hann kemur inn á virkið. Tá fiskurin verður landaður, verður fiskur og køldi sjógvurin pumpaður í móttøkukarið á virkinum. Fiskurin fer so víðari inn á virkið meðan køldi sjógvurin verður pumpaður umborð aftur á skipini.. Varðin Pelagic hevur mannagongd um at kunna skipaleiðslur á skipum um, at køldi sjógvurin ikki skal pumpast út á sjógv, fyrr enn skip eru komin út á streymasjógv.

### *Framleiðsla av frystari vøru*

Fiskasløgini til framleiðslu av frystari vøru eru fyri tað mesta makrelur, sild, svartkjaftur, lodna og smávegis nøgdir av øðrum fiski. Fiskurin verður skildur í støddir, og kann verða frystur heilur, ella avhøvdaður og kruvdur sum flaps ella flak. Meginparturin verður fryst í blokk, men møguleiki er eisini at einkultfrysta fisk. Aftann á innfrysting verður fiskurin pakkaður í eskjur, sum verða stáplaðar á plattar og settar á frystigoymslu til avskiping.

Fráskurður og skaddur fiskur hevur seinastu árini verið sendur til Havsbrún, men er ætlanin nú fyrst at gera súrløgu burtur úr hesum, og seinni, tá ið útbyggining er liðug, at størsti parturin av hesum verður brúkt til fiskaprotein- og lýsiframleiðslu. Nýggja framleiðslan fer at gera, at virkið kann taka ímóti meiri rávøru til høvuðsframleiðsluna.

### *Framleiðsla av fiskaproteini og -lýsi*

Nýggja framleiðslan av fiskaproteini og lýsi fer at hava eina framleiðsluorku á 1.400 tons av rávøru um samdøgrið. Øll framleiðslan fer fram í hølum fyri seg. Avskurður og fráskildur fiskur frá verandi framleiðslu verður gjørt til fiskaprotein og lýsi. Ætlanin er eisini at kunna framleiða fiskaprotein og lýsi úr heilum lastum og pørtum av lastum sum verða landaðar til virkið. Framleiðslan er bygd upp við fýra prosesslinjum til koagulering og dekantaraskipan til separering, og síðani trimum vakuum-turkarum. Límvatn fer til inndamping og síðani turkararnar. Lidna proteinið verður pakkað antin í sekkir ella flutt í goymslutangar, og lýsið fer í goymslutangar.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

Virkið verður bygt til eisini at kunna framleiða við lægri framleiðsluorku, tá ið minni rávøra er tøk. Framleiðslan fer væntandi at koyra við mestu framleiðsluorku í fyrru hálvu av árinum (januar - mai). Síðani væntast nakrir fái dagar við mestu framleiðsluorku í juni og juli. Frá august til desember væntast framleiðslan at koyra við lágari framleiðsluorku, tá ið einasta tøka rávøran verður avskurður og fráskildur fiskur frá verandi framleiðslu.

***Framleiðsla av súrløgu***

Framleiðsluorkan til súrløgu er 1.500 tons um samdøgrið. Til framleiðsluna skulu 10 tangar setast upp sunnan fyri virkið, ein til avskurð og fráskildan fisk á 100 $m^3$, fýra framleiðslutangar á 500 $m^3$, tríggir goymslutangar á 500 $m^3$ og tveir kemikaliitangar á 38 $m^3$. Allir tangarnir vera í einum tveir metur høgum tangagarði, sum klárar at taka innihaldið í einum 500 $m^3$ súrløgutanga.

Fiskur, sum ikki kann frystast og avskurður fer í móttøkutangan, har tað í botninum er ein knívapumpa, sum melur fiskin sundur og pumpar hann yvir í ein framleiðslutanga, har meyrusýra verður tilsett. Umrøring er í framleiðslutangunum. Frá framleiðslutanganum verður súrløgan pumpað í goymslutangar, til hon verður avskipað. Súrløgan verður pumpað úr goymslutangunum í tangar umborð á móttøkuskipi.

Tá ið protein- og lýsiframleiðslan er komin í gongd, verður væntandi minni gjørt til súrløgu. Um rávørugóðskan ikki er nóg góð, ella nøgdin ov lítil til protein- og lýsiframleiðslu, fer rávøran til súrløgu. Fiskur sum kemur frá reinsiskipan, og tí ikki egnaður til matna, fer altíð til súrløgu. Virkið fer møguliga eisini at taka ímóti súrløgu frá skipum, sum framleiða súrløgu umborð. Súrløgan verður seld til fóðurframleiðslu.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

# 7. Fylgiskjal 2. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Vísandi til § 31 í umhvørvisverndarlógini skal góðkenning nevnd í §§ 26-28 innihalda áseting av teimum umstøðum, ið lagdar eru til grund fyri góðkenningini, her uppií støðu av fyritøkuni, virkinum ella útbúnaðinum á føstu ognini, og tær atgerðir, ið virkið hevur sagt frá, at tað vil fremja ímóti dálking. Tilskilast skal, hvørjar atgerðir verða framdar við tí endamáli at minka um hesa dálking.

Virksemið hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri byrjaði í 2012, og var verandi virkið bygt í 2017/2018, eftir at gamla virkið brendi niður.

Virksemið fer fram á einum áleið 450 x 100 metra stórum øki á havnarlagum á Tvøroyri. Tætt omanfyri er m.a. miðstaðarøki, har eisini bústaðir eru. Bústaðarøki eru nakað longur oman fyri virkið og eru spjødd bæði eystur- og vestur eftir. Góðir 70 metrar eru frá verandi virki til næsta bústaðarøki.

Í hesum parti verða umhvørvisviðurskiftini lýst, fyri at fáa greiði á, hvørjar treytir skulu setast til virksemið. Í viðgerðini av umhvørvisviðurskiftunum er mesti dentur lagdur á at fyribyrgja heilsuskaðum, ampum og dálking av náttúruni við at minka um útlát av royki, dusti, lukti, larmi og spillvatni frá virkseminum, og at minka um árin frá dálking við olju, lýsi og kemikalium vegna óhapp. Metingin av umhvørvisviðurskiftum er grundað á framleiðslunøgdirnar í Talvu 1.

## 7.1. Orkuskipan

Varðin Pelagic fer eftir ætlan at hava tveir oljuriknar dampketlar uppá samanlagt 20 MW. Roykurin frá ketlunum verður leiddur ígjøgnum ein 60 metur høgan skorstein, ið skal byggjast við orkumiðstøðina, sum er norðan fyri virkið, har gamla kappróðrarneystið stendur.

Orkan til virksemið kemur frá SEV og frá oljuketlunum. Transformarastøðin hjá SEV er norðan fyri virkið.

Oljunýtslan fer at liggja um 30-40 litrar av olju pr. tons av ráavøru ella um 55.000 litrar av olju um samdøgrið tá ið virkið koyrir við mestu framleiðslu. Oljunýtslan er m.a. tengd at feittinnihaldinum í rávøruni.

## 7.2. Goymslur

Á verandi virki er eingin rávørugoymala. Skipið, sum liggur við kei hevur fiskin umborð í RSW tangum, og pumpar fiskin inn á virkið, sum arbeiðir fiskin so hvørt. Verandi virki hevur tríggjar samanbygdar frystigoymslur á tilsamans 11.000 tons.

Ein goymslubygningur skal byggjast, har fylt verður út á sjógv eystan fyri verandi virki. Víddin á goymslubygninginum er 40 x 50 m og hæddin 7 m. Goymslubygningurin skal kunna rúma umleið 4.000 tonsum av fiskaproteini í sekkjum og IBC-tangum við lýsi.

Eitt rúm til goymslu av kemikalium verður væntandi bygt næst orkumiðstøðini. Her verða kemikalii til cip reingerð goymd, umframt antioxidant og edikasýra. Kemikalii til reingerð standa í sama rúmi, men eru atskild frá hinum kemikaliunum.

Í talvu 3 niðanfyri er yvirlit yvir goymslutangar á virkinum.

**Talva 3.** Goymslutangar

| Tal av tangum | Evni | Stødd | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| 3 | Rávørutangar | 190 tons | 570 tons |
| 4 | Fiskaprotein | 1.230 tons | 4.920 tons |
| 4 | Lýsi | Ikki avgjørt | 2.000 tons |
| 1 | Tangi til avskurð og fráskildan fisk | 100 $m^3$ | |
| 4 | Framleiðslutangar til súrløgu | 500 $m^3$ | |
| 3 | Goymslutangar til súrløgu | 500 $m^3$ | |
| 2 | Meyrusýra til súrløgu | 38 $m^3$ | |
| 1 | Oljutangi | 55.000 l | |

Oljutangin verður grivin niður og fara lýsi- og súrløgutangarnir at standa í tangagarði, ið rúmar nøgdini á tí største tanganum.

Í kap 4. eru treytir settar til goymslur, t.d. til tangagarðar, eftirlit og um skrivligar mannagongdir fyri viðlíkahald o.a.

## 7.3. Útlát til luft

Virkið fer at hava útlát til luft frá framleiðsluni, umframt $NO_x$ og CO frá ketlunum. Virkið hevur gjørt fleiri átøk fyri, at luktur frá framleiðsluni ikki verður ein trupulleiki í nærumhvørvinum. Punktútsúgvingar á útgerð tryggja, at allur dampurin verður samlaður og reinsaður, í staðin fyri at verða spjaddur í framleiðslurúmunum. Rúmútsúgvingar í øllum framleiðsluøkinum tryggja, at møguligt útlát verður samlað og reinsað. Øll luft frá framleiðslunihølunum og punktútsúgvingum verður reinsað í sjógvskrubbarum, áðrenn luftin verður leidd gjøgnum skorsteinin. Sjógvurin, sum verður nýttur í skrubbarunum fyri at reinsa luft, verður leiddur á sjógv.

Fyri at avmarka dust frá framleiðsluni er ætlanin at brúka “indirect steam” turkarar, og verður dampurin frá turkarunum vaskaður í einum partikulvaskara, áðrenn hann verður sendur til spillhita-inndampara og koagulatorar. Her verður størsti parturin av dampinum kondenseraður, og restin verður kondenserað í einum restgas-kondensatori. Eftir hetta er bara luft eftir, sum verður leidd til skrubbarar til luktreinsing, áðrenn luftin verður beind til skorsteinin. Hetta merkir, at møguligt støv frá turkarunum verður vaskað út, og endar sum BOD í kondensatinum, ikki í luftútlátinum frá skorsteininum.

Øll liðugvøra verður handfarin í afturlatnum skipanum inni á virkinum, og pakkað antin í sekkir ella flutt í goymslutangar. Til avskiping í bulk verður ein afturlatin skipan brúkt. Fyri at avmarka, at dust kemur út í umhvørvið, ætlar P/F Varðin Pelagic at brúka flutningsfør, ið hava afturlatnar goymslutangar, tá ið hetta er møguligt.

Harumframt hevur Varðin Pelagic gjørt tvær modeleringar av spjaðing av royki frá skorsteininum á virkinum. Ráðgevingarfyritøkan NIRAS hevur brúkt OML modellið til

útrokningar fyri at tryggja nøktandi luftreinsan og dimensionering av skorsteini, soleiðis at B-virðir og markvirðir fyri luktampa verða hildin í økinum.

Útrokningarnar eru gjørdar fyri rávøru við TVN, sum er 40-50 mg/100 g. Grundarlagið fyri hesum eru søgulig tøl fyri TVN á rávøru, sum er landað til ídnaðin frá skipum hjá samtakinum Varðin í tíðarskeiðinum 2008 til 2020.

TVN stendur fyri Total Volatile Nitrogen. Tað er ein lyklaparametur, sum verður brúktur til at meta um dygdina og feskleikan á rávøru til framleiðslu av fiskaproteini og øðrum fiskavørum. TVN er nøgdin av lufrvornum nitrogensambindingum, sum fyrst og fremst umfata ammoniakk, trimethylamin (TMA) og dimethylamin (DMA), sum verða framleidd tá ið proteininið í fiski verða niðurbrotin. At fylgja við TVN hjálpir við at áseta góðskuna hjá fiskaproteini. Lág TVN virðir vísa á feska vøru, meðan hægri virðir vanliga benda á, at vøran er farin at eldast, meira framkomna niðurbróting og lægri dygd.

Útrokningarnar vísa, at skorsteinurin eigur at vera í minsta lagi 60 metrar høgur, fyri at markvirði fyri lukt á 1 OU/$m^3$ verður hildið á ovastu búsetingunum á Tvøroyri. Orsøkin til, at skorsteinurin má vera so høgur er, luktur frá framleiðsluni í mun til brøttu fjallasíðuna og at búsetingarnar liggja lutfalsliga høgt. Umhvørvisstovan hevur kravt, at útrokningar fyri spjaðing av luft verða gjørdar við OML modellinum, hóast OML modellið upprunaliga er gjørt til flatlendi. Varðin Pelagic hevur tí sum ískoyti fingið norsku fyritøkuna Purenviro at gera nakrar modeleringar við AEROMOD, sum vanliga verður brúkt í Noreg (óslætt lendi). Úrslitini vísa tað sama sum tey hjá NIRAS, at við einum 60 metrar høgum skorsteini ber til at halda markvirðið fyri lukt.

Í kap. 4 verða m.a. treytir settar um, at virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttanfyri øki virkisins, umframt at Varðin Pelagic skal halda ymisk markvirði útlát til luft.

## 7.4. Útlát á sjógv

Varðin Pelagic brúkar í dag sjógv til køling, sjógvurin verður tikin inn á sunnaru síðu á fjørðinum. Hesin sjógvur verður eisini nýttur í eini hitapumpu til upphiting av hølunum, og síðani leiddur út á fjørðin aftur. Nøgdin av sjógvi er umleið 2.000 $m^3$ um tíman.

Í dag fer vatn frá framleiðsluni á virkinum umvegis fitlurbond og luftflotatiónstanga, har mest møguligt lívrunnið tilfar verður reinsað frá. Síðani verður spillvatnið leitt í kommunala spillvatnsleiðing, sum gongur 150 metrar út frá kaikantinum.

Spillvatnsreinsiskipanin verður útbygd til eisini at kunna taka framleiðsluvatn- og vaskivatn aftan á útbyggingina. Spillvatn frá folkarúmun fer umvegis rottanga í spillvatnsleiðing. Útleiðing frá verkstaði og smiðju verður leitt umvegis oljuskiljara í spillvatnsleiðing. Yvirflatuvatn, har dálkandi virksemi kann væntast, verður leitt gjøgnum sandfiltur og í spillvatnsleiðingina. Har einki dálkandi virksemi er, verður yvirflatuvatnið leitt beinleiðis út á sjógv.

Tá ið útbyggingin av virkinum er liðug, verður sjógvur frá skrubbarum, kondensat og kølivatn frá varmavekslaranum leitt óreinsað í spillvatnsleiðingina. Samanlagda nøgdin av hesum spillvatni er um 1.058 $m^3$/h, harav kondensatið er 3,7 %. Tað verður nakað av $NH_3$, TMA og CO í

útlátinum. Alt annað spillvatn fer umvegis reinsing, áðrenn tað fer í spillvatnsleiðing á sjógv. Hetta umfatar vatn frá framleiðsluni, vasking av framleiðsluhølum og framleiðsluútgerð, dálkað kondensat, spillvatn frá fólkarúmum, verkstaði og smiðju.

Í sambandi við útbyggingina fer Varðin Pelagic at leggja eina nýggja spillvatnsleiðing. Ætlanin er at leggja spillvatnsleiðingina soleiðis, at útlátið liggur so langt út til fjarðamunnan sum møguligt, har streymviðurskiftini gera, at einki lívrunnið tilfar hópast upp. Staðsetingin er ikki fastløgd enn, og skulu streymkanningar vísa hvar best er at leggja spillvatnsleiðingina.

Har lýsi- og súrløgutangar eru, verður uppsamlingargarður gjørdur, ið rúmar nøgdina á tí størsta tanganum. Regnvatn, sum skal leiðast burtur úr uppsamlingargarði, verður leitt út undir kontroleraðum umstøðum. Har kemikaliugoymsla er, verður uppsamling soleiðis, at møguligir lekar kunnu haldast aftur, og ikki fara út í spillvatnsleiðing. Yvirflatuvatn, har dálkandi virksemi kann væntast, so sum sandur og vanligur skittur, verður leitt ígjøgnum sandfiltur og í spillvatnsleiðing. Har einki dálkandi virksemi er, verður yvirflatuvatnið leitt beinleiðis út á sjógv.

Treytir verða settar til staðseting av spillvatnsleiðing, kanningar av spillvatni o.a.

## 7.5. Óljóð

Óljóð kann koma frá sjálvum virkinum og frá uttandura aktivitetum, sum hoyra til virkið, so sum skipaferðslu, frá landing og avskiping. Fyri at minka um óljóð frá virkinum verður framleiðslubygningurin deildur upp í rúm, soleiðis at góð ljóðbjálving er har, sum mest larmandi útgerðin stendur, umframt at útveggir verða ljóðbjálvaðir væl. Harafturat er útgerð, sum vanliga stendur uttandura, sett inn í bygningin fyri at minka um larm.

Fyri at meta um óljóðið frá samlaða virkseminum, tá ið virkið er útbygt, eru ljóðmátingar gjørdar á fiskaprotein og lýsiverksmiðjum í Íslandi og Noreg, mátingarnar eru gjørdar í samráð við Jóhannes Steingrund, Steingrund Aukistik. Hesar ljóðmátingar, umframt mátingar og útrokningar, sum Steingrund Aukustik hevur gjørt av núverandi virki og skipanum, eru brúktar sum grundarlag fyri simulering, sum Steingrund Aukustik hevur gjørt.

Í Útrokningunum í frágreiðingini hjá Steingrund eru tvær rakstrarstøður brúktar:

- Rakstrarstøða 1: tá ið mesti aktivitetur er á verandi virki, t.e. tá full framleiðsla er á virkinum, skip liggur og landar rávøru og frystifarmaskip liggur við kei og verður lastað við frystari vøru. Fyri skip eru ljóðmátingar frá Gøtunesi áðrenn ljóðdoyving varð gjørd, brúktar, tí tað er tað skipið, sum larmaði ringast.
- Rakstrarstøða 2: tá er mesti aktivitetur aftaná at virkið er útbygt, tvs. at bæði núverandi virki og nýggja framleiðslan koyra við fullari megi. Skip liggur og landar rávøru (Gøtunes), frystifarmaskip tekur ímóti frystari liðugtvøru og farmaskip tekur ímóti fiskaproteini.

Steingrund Akustik hevur gjørt simuleringar har hesar rakstrarstøður eru lagdar inn í eina ljóðmynd fyri øki kring virkið á Tvøroyri.

Úrslitini av simuleringini fyri rakstrarstøðu 1 vísa, at virkið fyri tað mesta heldur markvirðini fyri óljóðstøði í Umhvørvisgóðkenningini. Tó heldur virkið ikki markvirðini fyri óljóð í bústaðarøki B1 omanfyri virkið um náttina. Hægstu óljóðsískoytini í rakstrarstøðu 1 koma frá ventilatorum og skorsteininum á Gøtunesi.

Úrslitini av simuleringini fyri rakstrarstøðu 2 vísa, at størri ljóðdoyving er neyðug, fyri at at markvirðini fyri óljóð kunnu haldast. Hægstu óljóðsískoytini í rakstrarstøðu 2 koma frá fiskaprotein og lýsiframleiðsluni, skrubbarahøllini og gaffitrukki millum fiskaprotein og lýsiframleiðslu og goymslu.

Í frágreiðingini frá Steingrund Akustik verður sagt, at fyri at tryggja, at virksemið hjá Varðanum Pelagic lýkur markvirðini fyri ískoyti av óljóði í framtíðini, er neyðugt at gera ávísar ábøtur. Í frágreiðingini eru eisini gjørd tilmæli um ábøtur.

Til rakstrarstøðu 1 er tilmælið at ljóðdoyva skorsteinin á Gøtunesi í minsta lagi 10 dB. Arbeiðið er gjørt.

Til rakstrarstøðu 2 eru fleiri tilmæli, harímillum at dempa skorsteinin á Gøtunesi, at dempa ávísar fasadur á fiskaprotein og lýsiframleiðsluni og á skrubbarahøllini og at tillaga umstøðurnar fyri at tarna óljóði frá gaffiltrukki at ferðast niðan í bygdina, ella nýta gaffiltrukk við el-motori ístaðin fyri diesel.

Sambært Steingrund Akustik kann virkið lúka markvirðini fyri óljóð alt samdøgrið, um tilmælini verða framd.

Varðin Pelagic hevur upplýst, at hædd verður tikin fyri tilmælum, tá ið tilfar til konstruktión av bygninginum skal veljast, soleiðis at neyðug ljóðdoyving kann røkkast. Somuleiðis er neyðugt við ljóðdoyving av skipum, sum landa til virkið. Hetta arbeiði er eisini í gongd.

Steingrund Akustik tryggjar ljóðdoyving av innsúgvingum og útblásingum í samstarvi við veitarar av ventilatiónini og skorsteininum.

Treytir verða m.a. settar um ískoytið til óljóðtyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá Varðanum Pelagic og beinleiðis avleiddum virksemið, at Varðin Pelagic skal gera nýggjar kanningar av óljóði, tá ið framleiðslan av fiskaprotein og lýsi er farin í gongd. Treyt verður sett um, at Varðin Pelagic brúkar bestu tøku tøknina til ljóðdoyving á øllum útlátseindum til luft, og at Varðin Pelagic í minsta lagi skal fylgja tilmælunum í frágreiðingini frá Steingrund Aukustik fyri at tryggja at virkið kann lúka markvirðini fyri óljóð.

Treyt verður sett um, at Varðin Pelagic brúkar so ljóðveik og ljóðmeinaleys flutningasakfør sum gjørligt, og at Varðin Pelagic kunnar bilførarar og skipaleiðslur um, at arbeiða so skynsamt sum gjørligt, so ljóðstøðið verður so lágt sum gjørligt.

## 7.6. Burturkast

Sambært umhvørvisfrágreiðingunum seinastu árini hevur Varðin Pelagic sent umleið 120.000 kg av burturkasti til IRF árliga, áleið 20.000 kg til endurnýtslu, 1.000 kg til tyrving og 100.000 kg til brenning.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo

Umframt at fylgja galdandi reglum, verða ymsar treytir settar til handfaring og burturbeining av burturkasti.

## 7.7. Tilbúgving móti brádliga øktari dálking

Varðin Pelagic hevur lutfalsliga stórar goymslur av olju, lýsi og súrløgu. Har lýsi og súrløgutangar standa verða verjugarðar gjørdir, sum taka nøgdina í størsta goymslutanganum. Harafturat hevur Varðin Pelagic fiskaprotein á goymslu.

Dálkingarvandar eru, at meira olja, lýsi ella súrløga verður pumpað í tangarnar, enn teir taka, ella at tangarnir fáa skaða ella skrædna, so at meginparturin av innihaldinum sleppur út. Verjugarðarnir fyribyrgja størri dálking av hesum, um annars rætt er borið at.

Harafturat er vandi fyri, at t.d. eldur kemur í fiskaprotein, og at hesin eldur breiðir seg til lýsitangarnar nærhendis.

Krav verður sett um, at Varðin Pelagic ger eina váðameting av óhappum, sum kunnu føra til brádliga økta dálking.



**Umhvørvis**stovan· Traðagøta 38 · FO-165 Argir · Tlf: +298 342400 · Fax: +298 342401· us@us.fo · www.us.fo